| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. september 2017 | Blað nr.: 1<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 28. september 2017 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Bjørg Dam

**LUTTÓKU EISINI:**
Mikael Viderø
Jóan Petur Hentze
Sigurð Ó. Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 201/17 | 17/01364-9 | Bjørghild Djurhuus: farloyvi frá býráðnum | 4 |
| 202/17 | 17/00041-1 | Mál beind í nevndir 2017 | 5 |
| 203/17 | 17/02935-3 | Søla matr. nr. 203m, Kollafjørður. | 6 |
| 204/17 | 17/01099-1 | Uppskot til víðari framferð av húsinum í Brekkugrund | 7 |
| 205/17 | 17/00433-4 | Umsókn um gerðabýti við Tórshavnar kommunu | 10 |
| 206/17 | 17/02942-1 | Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði | 14 |
| 207/17 | 15/03760-1 | Talgild plássávísingarskipan til dagstovnaøkið | 17 |
| 208/17 | 17/02914-1 | Áheitanir um at fáa fleiri kommunulæknar | 22 |
| 209/17 | 16/04796-2 | Samferðslumálaráðið : Uppskot broyting í koyrikortskunngerðini (prutl) o.a. | 24 |
| 210/17 | 17/02413-2 | Gøtunavn til útstykking á matr nr. 1361b við Villingadalsvegin, Tórshavn | 28 |
| 211/17 | 15/03535-3 | Samstarvsavtala við Fróðskaparsetur Føroya | 29 |
| 212/17 | 16/04312-1 | Skoytubreytin | 34 |
| 213/17 | 14/00949-2 | Vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu | 39 |
| 214/17 | 16/04071-3 | Parkeringsøki millum MBM og Hoyvíkshøllina | 44 |
| 215/17 | 14/01828-52 | Útstykking í Nólsoy - nevndarsamtyktir - broyting av byggisamtykt (2006-1856) | 46 |
| 216/17 | 17/00971-3 | Verkætlan til framhald av útstykkingini Klingrutjørn - Klingurstjørn | 54 |
| 217/17 | 17/00972-2 | Umsókn til yvirtøku av vegi, matr. nr. 1109n, Tórshavn | 56 |
| 218/17 | 17/02296-2 | Dagføring og umlegging av kloakk Landaveg Íslandsveg 2. byggistig | 57 |
| 219/17 | 17/02741-1 | Kommunuskúlagarðurin | 58 |
| 220/17 | 17/02439-1 | Útstykking Kaldbak - Fyrispurningur um íbúðarbygging | 60 |
| 221/17 | 17/02480-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini - nýggjar ásetingar fyri A1 um íbúðir | 64 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 222/17 | 17/02748-1 | Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir | 66 |
| 223/17 | 17/03037-1 | ClimatePlanet, 13. oktober 2017 í Keypmannahavn | 69 |
| 224/17 | 17/02930-1 | Grótið frá Sandoyartunlinum | 71 |
| 225/17 | 17/02908-2 | "Sandoyartunnil – Vegaføringin við Gomlurætt" | 73 |
| 226/17 | 16/04639-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina | 77 |
| 227/17 | 17/01619-1 | Fíggjarætlan 2018 | 78 |
| 228/17 | 17/00303-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017 | 83 |
| 229/17 | 17/01304-1 | Flytilig áskoðarapláss o.a. í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi | 85 |

## ***201/17 Bjørghild Djurhuus: farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 201/17 | 17/01364-9 |

**Málslýsing:**
Bjørghild Djurhuus hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Bjørg Dam, eru loknar.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Samtykt.

## 202/17 Mál beind í nevndir 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 42/17 | 17/00041-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 61/17 | 17/00041-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 92/17 | 17/00041-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 117/17 | 17/00041-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 135/17 | 17/00041-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 157/17 | 17/00041-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 202/17 | 17/00041-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 203/17 Søla matr. nr. 203m, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 185/17 | 17/02935-3 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 203/17 | 17/02935-3 |

**Málslýsing:**

Søla av grundstykkið.
Matr.nr. 203m, Lygnes Kollafjørður.
Vídd 566m.
Grundstykkið er útgrivið og planerað.

Grundstykkið hevur ligið á sølulista hjá BetriHeim.

Innkomið boð er kr. 500.000,00 og er boðgevingin støðgað.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja grundstykkið fyri innkomið boð kr. 500.000,00

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 204/17 Uppskot til víðari framferð av húsinum í Brekkugrund

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 76/17 | 17/01099-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 86/17 | 17/01099-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 130/17 | 17/01099-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 107/17 | 17/01099-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 146/17 | 17/01099-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.09.2017 | 215/17 | 17/01099-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 204/17 | 17/01099-1 |

**Málslýsing:**
Húsaumsitingin hevur arbeitt við uppskoti til ætlan fyri arbeiðið at umvæla ognina á Bringsnagøtu 13, matr. nr. 120, Tórshavn.

Umvælingarnar av hesari ognini eru nógv størri enn væntað, so at siga alt húsið er rotið og skal gerast av nýggjum.

Vit hava arbeitt við tveimum loysnum, umvæling og byggjan av nýggjum.

Umvæling krevur, at útveggir verða gjørdir av nýggjum, har eru ongar konstruktiónir, sum bera ella stabilisera húsið. Sperrurnar í takinum skulu skiftast. Alt inni í húsinum skal gerast av nýggjum, tí tað er rotið. Gólvið skal gravast upp, og har má drenast bæði úti og inni. Við hesi loysn fáa vit ikki ein gott hús, og umvælingar mugu eisini gerast uttan, innan ikki ov leingi.

Hetta arbeiði kostar umleið 400.000,- kr. og tekur umleið 2-3 mánaðir. Sí frágreiðing dagfest 8. mars 2017.

Nýtt hús krevur, at húsið verður tikið niður, nýtt byggiloyvið og hoyring frá Reynanevndini. Húsið verður bygt uppaftur í saman sniði.

Hettar arbeiði kostar umleið 500.000,- og tekur umleið 4-5 mánaðir.

Húsaumsitingin hevur ikki sett pengar av til hesa umvæling í 2017.

Umsitingin er vitandi um at ynski er at fáa fleiri fólk at búgva økinum. Tí verður mælt til, at verður ognin seld, eigur bústaðarskylda at vera lýst í skeytinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til at nevndin tekur undir við at ognin verður seld og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og at bústaðarskylda verður lýst í skeytinum, tá ognin verður seld.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, vísir til støðu sína í byggi- og býarskipanarnevndini 5. apríl 2017.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Húsini vórðu skrásett í Tórshavnar býaratlas, tá hetta varð varð gjørt í 2006, sí viðhefta kort.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, vísir til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 5. apríl 2017 og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, vísir til støðu sína á fundinum í byggi- og býarskipanarnevndini 5. apríl 2017.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Samtykt við 7 atkøðum fyri og 6 ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Ískoyti.**

Ognin hevur verið á sølulista hjá BetriHeim.

Sambært boðum frá meklara er innkomið boð pr. 31.07.2017 kl. 14:54 kr. 750.000,00
Boðgevarin við næsthægsta boðnum bjóðar ikki hægri, og hevur meklarin sagt øllum frá.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja ognina fyri innkomið boð kr. 750.000,00

**Fíggjarnevndin 22. september 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Atkvøddu blankt:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

## 205/17 Umsókn um gerðabýti við Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 58/17 | 17/00433-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 91/17 | 17/00433-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 176/17 | 17/00433-4 |
| 4 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 197/17 | 17/00433-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 187/17 | 17/00433-4 |
| 6 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 205/17 | 17/00433-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur fyrispurning frá eigaranum av matr. nr. 1384, við rundkoyringina við Eystara ringveg, um kommunan er sinna at makaskifta:

- Ogn sína, matr. nr. 1384 við rundkoyringina við Eystara ringveg, við
- Vinnustykki, matr. nr. 139ab, á Skarðshjalla, ið kommunan eisini skal átaka sær at asfaltera.

Sí Kort 1, myndir av matr. 1384 við Eystara ringveg og 139ab á Skarðshjalla.

Av tí at matrikulin er í umráðið C1 í tættari miðstaðarbygging, er tað avmarkaðir møguleikar fyri umbyggjan og nýbyggjan.

Orsakað av vánaligum atkomumøguleikum til matrikulin, verður byggiloyvi ikki givið bygningi við vinnuligum endamáli.

Um kommunan keypir matrikulin, kunnu plantast trø og runnar til prýðis, og møguleiki er eisini fyri at seta nakrar benkur til uppihald, tó skal havast í huga at útsýnið hjá ferðandi, má ikki skerjast. Økið er ábart fyri vesturættunum, so lívdin er ikki tann besta.
Hugsast kann, at økið kann brúkast til møguliga útbyggjan av rundkoyringina á Hálsi, ella gerð av súkklubreytum, men í løtuni eru ongar útbyggingar- ella broytingar ætlanir av rundkoyringini.

Eftir býarskipanarligum tørvi í dag, er tað ikki umráðandi at kommunan ognar sær matrikulin, einasta endamálið við keypinum í dag vil vera, at økið verður fríðkað, og húsið verður niðurtikið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**§ 19. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. grundumráði**
1 Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.
2 Útstykking innan teir einstøku umráðispartarnar verður einans loyvd serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri umráðispartin.
3 Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.
4 Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Byggi- og umhvørvisdeildin hevur upplýst umsøkjara í skjal nr. 2011-1940-4, at hann kann taka verandi bygning niður og byggja ein annan tilsvarandi bygning í staðin, sum er eini sethús ella í mesta lagi eini dupulthús.

**Mál nr. 2011-1940-17 Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Fíggjarnevndin tekur ikki av tilboðið frá eigaranum, um at keypa av matr. 1384 fyri kr. 850.000,00 + tinglýsingarútreiðslur kr. 5.250,00. Um húsini skulu takast niður, er mettur kostnaður 100.000 afturrat.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í 2010 vendi Bank Nordik sær til kommununa og bjóðaði kommununi ognina við ringvegin fyri 1 mió. men kommunan ynskti ikki at keypa ognina fyri tann prísin, men kundi kanska ganga við til 750.000 kr., ið seinni bleiv lækkað til 500.000. Sølan bleiv ikki gjøgnumførd.Tá kunnaði kommunan Bank Nordik um, hvat økið kundi brúkast til, og har stendur m.a.: " Tó kann staðfestast, at bygt er í vinnuøkinum á Hálsi eftir leiðbeinandi skipanum fyri økið, sum eru gjørdar av kommununi í 1973 og revideraðar í sept. 1975. Av hesum skipanum framgongur, at matrikulin, sum húsini liggja á, er merkt sum "felagsøki, fyribils ikki alment" og sum "privat øki" á hesum kortskjølum, og vísir hetta, at ætlanin ikki er, at nýbygging skal fara fram á matr. nr. 1384, og at ætlanin hevur verið at leggja økið til felagsøki, tá húsini á økinum ikki longur standa har.

**Fíggjarlig viðurskifti, Notat um ognina 17/00433-3**
Núverandi eigari keypti ognina í 2015 fyri 1,1 mió.

Virði á stykkinum á Skarðshjalla er 1.038.700 og asfalteringin fer at kosta einar kr. 240.000 (út frá 300 kr./m$^2$), tilsaman kr. 1.278.400 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Løgdeildin fer í samráðingar við eigaran, um keyp av matrikul 1384 við Eystara Ringveg, fyri virði, ið matrikulin hevur í dag, og selur teimum vinnustykki á Skarðshjalla matrikul 139ab fyri kr. 1.038.700, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Samráðst hevur verið við eigaran ið hevur endurtikið, at afturfyri matr. nr. 1384 Tórshavn ynskir hann matr. nr. 139ab á Skarðshjalla og at kommunan asfalterar øki. Hetta gevur ein samlaðan kostnað fyri matr. nr. 1384 á umleið 1,3 mió. kr. ið byggi- og býarskipanarnevndin ikki hevur ávíst fígging til.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla frá, at keypa ognina vísandi til, at ongar ítøkiligar ætlanir er við økinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og leiðaranum á løgdeildini.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin metir, at tað er sera týdningarmikið, at Torshavnar kommuna ognar sær matrikulin.

Talan er um eitt tað mest trafikeraða vegamótið í landinum og tað eru fleiri atlit kommunan eigur at taka ið í málinum. Eitt er tað býarskipanarliga og ferðslutekniska, eitt annað er árinini av tí virksemi ið kann koma á økið, um kommunan ikki keypir økið.

Matrikkulin liggur á einum horni og er ein framsíða ímóti býnum. Tað er ynskiligt, at øki er innbjóðandi fyri tey sum koma við bili ella til gongu. Við at keypa matrikulin kann kommunan betur skipa viðurskiftini í økinum, eisini við atliti til ferðsluviðurskiftini og parkeringsviðurskiftini í økinum. Við einum volla kann eitt parkeringsøkið á økinum avbyrgjast og fríðkast við vøkstri og saman við eini møguligari súkklubreyt gerst upplivingin hugaligari hjá fólki á súkklu ella til gongu.

Lagt verður upp til, at atkoman til parkeringsøkið verður frá Staravegnum, ið krevur eina marknaðarumskipan við Sp/f Berg Motors. Harafturat kann framsíðan við vegin og út ímóti býnum gerast ein onnur, sum í dag ikki er væl tillagað til nærumhvørvið við vegin, og tá verður høvi til at umskipa gongubreytinta fram við bygninginum hjá Sp/f Berg Motors, ið eisini vil økja trygdina hjá borgaranum.

Við at keypa ognina verða eisini fleiri avbjóðingar loystar. Ognin liggur í dag sum ein blindtarmur við skerdum atkomumøguleikum, og tí vildi tað verið ein avbjóðing at skipa eina íbinding í vegakervi, m.a. tí rundkoyringini er tætt við ogninga og talan er um nógv trafikeraðan høvuðsveg.

Tórshavnar kommuna hevur seinastu nógvu árini fingið nógvar umsóknir um økt og broytt virksemið á júst hesi ognini, ið vildi havt nógva ferðslu við sær. Kommunan hevur í fleiri førum noktað nýggja virksemið við støðið í táverandi byggisamtyktarásetingum. Hesar ásetingar eru nú broyttar fyri alt økið, og tað kann tí vera ein avbjóðing at noktað fyri einum virksemið á ognini, sum væl kann hugsast at hava økta ferðslu við sær og sum kanska ikki hóskar til øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at makaskifta matrikul 1384, Tórshavn, við vinnustykki á Skarðshjalla matrikul 139ab, Hoyvík, og at kommunan asfalterar øki á Skarðshjalla. Fíggja av 6175 keyp og søla og inntøkuføra 6975 byggibúning ídnaðarøki Skarðshjalli.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast við eigaran um at keypa ognina fyri ein lægri prís.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Samráðst hevur verið við eigaran ið er sinnaður at lata kommununi ognina fyri 1,1 mió, ið hann upplýsti hann hevði keypt ognina fyri. Húsið á ognini er í vánaligum standi og má takast niður. Hetta er mett at kostað umleið 150.000 kr. Harumframt er tørvur á fígging til tinglesing. Tilsaman einar 200.000 kr.

Samlaði fíggjartørvurin er umleið 1,3 mió.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at makaskifta matrikul 1384, Tórshavn, við vinnustykki á Skarðshjalla matrikul 139ab, Hoyvík, og at taka húsið niður.

Virði á stykkinum kommunan letur, 1.050.087 kr. verður fíggja av 6175 keyp og søla og inntøkuført 6975 byggibúning ídnaðarøki Skarðshjalli.

Munurin millum virði á stykkinum kommunan letur og stykkinum kommunan fær er 49.913 kr. Hesin verður goldin eigaranum og fíggja av 6175 keyp og søla.

Fígging til niðurtøku og tinglesing, 200.000 kr., verður fíggja av 6175 keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið við tilmæli um, at húsini verða niðurtikin beinanvegin, eftir at kommunan hevur ognað sær húsini.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

## 206/17 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 11.09.2017 | 16/17 | 17/02942-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 196/17 | 17/02942-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 206/17 | 17/02942-1 |

**Málslýsing:**
Tann parturin av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, tørvar stórar ábøtur. Bygningurin er upprunaliga frá 1960, men varð umbygdur og tikin í nýtslu sum røktarheim í 2004, seinni kom eisini dagtilhald.

Sbrt støðulýsing, ið gjørd varð í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, skulu brunaviðurskifti betrast munandi svarandi til uml. kr. 7 mió. Harumframt eru lekar, tak og arbeiðsumhvørvi, sum skal skiftast/betrast. Alt í alt verða hesar bygningsdagføringar mettar at kosta uml. kr. 18,5 mió.

Hetta er tí at meta sum sjálvstøðug íløguverkætlan.

Húsaumsitingin og Heilsu- og umsorganartænastan hava tí eisini umrøtt, hvørjir møguleikar eru at gagnnýta bygninginum meira í mun til tørvin hjá heilsu- og umsorganartænastuni at økja um tænastur og tilboð, serliga í mun til at fáa brúkt loftið.

<u>Demensdepil</u>
Í løtuni eru 10 búpláss til borgarar við demenssjúku í Kristianslon og dagtilhald er í Tjarnarlon.

Uppskotið er, at Tjarnarlon verður umbygd til 8 umlættingpláss ætlað borgarum við demenssjúku, og at loftið verður útbygt við kvistum soleiðis, at har verða høli bæði fyri dagtilhaldinum og til venjingar v.m. hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum, sum í dag mangla slíkar umstøður. Eisini verða gjørdar aðrar broytingar, sum antin hava við bygningskrøv at gera ella við betri funktionalietet í mun til virksemið.

Eitt skitsuprojekt er gjørt, sum lýsir hesar møguleikar, eins og at kravdu bygningsdagføringarnar eru tiknar við. Harumframt fyriliggur ein kostnaðarmeting, sí hjálagt hefti.

Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku sum verða knýttir til depilin, fáa tilboð sum er nøktar teirra tørvi á einum stað. Tað vil siga at ein borgari kann fáa dagtilhald, kvøldtilhald, vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er mett at vera ein fyrimunur fyri borgarar við demens, tí umhvørvi og starvsfólkini eru kend og skapar tað tryggleika fyri tann demesrakta.

Hesin demensdepil hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi meira fleksibult alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting styttri og longri, fyri síðan seinni at fáa fast búpláss alt í sama bygningi.

Eisini verður mett, at hetta fakliga og rakstrarliga hevur fyrimunir. Fakliga gevur hetta fleiri fyrimunir. Tann demensrakti verður í kendum umhvørvi og starvsfólkini á deplinum kenna

tann demensrakta, tað verður kontinuitetur í gongdini hjá borgaranum og harvið økist tryggleikin hjá tí demensrakta, sum hevur stóran týdning. Tey avvarðandi hava ikki sum í dag, fleiri stovnar og starvsfólk at fyrihalda seg til, tí borgarin fer at fáa øll tilboð á sama stað. Tað hevur sínar fyrimunir at vitanin verður savna á sama stað, hetta bæði tann fakliga vitanin, men eisini vitanin um borgaran. Tað er kent, at tá borgarar skifta millum stovnar detta týðandi upplýsingar um borgaran burtur. Tað verður væl léttari og skjótari at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, tí øll tilboðini hanga saman.

Tað er bráðfeingis tørvur á fleiri umlættingarplássum, eisini innan demens. Í mun til at byggja nýtt sjálvstøðugt, gevur henda loysnin rakstrarligar fyrimunir. Sjálvsagt krevur tað fleiri starvsfólk, tá 8 nýggj pláss verða gjørd, men í hesum føri ber til at samansjóða við verandi starvsfólkahóp á Kristianslon og dagtilhaldinum. Hetta ger, at økingin av starvsfólki verður minni enn um sjálvstøðug eind bleiv bygd. Økingin av starvsfólki svara til knapt 6 ársverk. Um hesi 8 plássini vóru bygd fyri seg, vildi tað verið neyðugt at sett áleið 8 ársverk. Umframt at hetta er ein fíggjarligur fyrimunur, er tað eisini ein fyrimunur í og við, at tað er avbjóðandi við rekruttering.

Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina er kr. 23,8 mió.

<u>Tilgongd víðari</u>
Henda ætlan við Tjarnargarði hongur saman við heildarætlanini um eldrabústaðir, sí mál 17/00586.

Mett verður, at byggitíð fyri hetta er uml. 12-14 mánaðir. Projektering og útboð tekur uml. 4-6 mánaðir. Í mun til hesa bygging verður mett skilabest at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku. Uppskot til tíðarætlan kann samsvarandi hesum síggja soleiðis út:

- Prosjektering byrjar 01. okt ´17
- Skipanaruppskot liðugt ultimo okt ´17
- Prosjektuppskot liðugt ultimo des ´17
- Myndugleikaprosjekt liðugt medio jan ´17
- Høvuðsprosjekt liðugt ultimo feb ´18
- Útboðstíðarskeið liðugt medio apríl ´18
- Avgerð um bygging og sáttmálar liðugt utimo apríl ´18
- Bygging byrjar 01. mai ´18
- Byggitíðarskeið 12-14 mðr
- Bygging takast endaligt í brúk juli/august ´19

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við verkætlanini sum lýst omanfyri, harundir at geva umsitingini heimild at gera ráðgevarasáttmála um prosjektering og útboð fyri í mesta lagi kr. 1 mió at játta av tøkum løgukarmi 2775 eldraøkt.

**Eldranevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 207/17 Talgild plássávísingarskipan til dagstovnaøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 187/15 | 15/03760-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 18/16 | 15/03760-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 301/16 | 15/03760-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 401/16 | 15/03760-1 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 328/16 | 15/03760-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 195/17 | 15/03760-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 194/17 | 15/03760-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 207/17 | 15/03760-1 |

**Málslýsing:**
Mentamálanevndin hevur á fundi 14. januar 2015 tikið undir við tilmæli um at fáa til vega nýggja KT-skipan til plássávísingina (mál 14/01148).

Í uppriti til tann fundin er greitt frá, at í dag finnast útlendskar KT-skipanir, har foreldur sjálvi bíleggja stovnspláss og taka av stovnsplássi alt um digitalan platform. Eisini ber til at skriva seg upp á ynskilista til eitt ávíst pláss, siga upp pláss, søkja um farloyvi v.m. Har ber altíð til at fáa dagført yvirlit yvir, um ella nær pláss er tøkt á stovnunum.

Skipanin kann eisini sjálv vísa foreldrum á tøk pláss í nærumhvørvinum og sjálvvirkandi geva foreldrum boð, um broytingar henda.

Ikki bert er hetta ein betri tænasta til foreldrini. Hetta er eisini gjøgnumskygt og lættir um hjá umsitingini. Uppgávan hjá kommununi verður at vegleiða foreldur í at nýta skipanina og tryggja at kommunan á skynsamasta hátt nøktar ansingartørvin í framtíðini. Eisini í mun til støðugt at hava nøktandi yvirlit yvir plásstørvin og veita foreldrum plásstrygd, kann skipanin verða gagnlig.

Tá varð eisini víst á, at neyðugt er at kanna, um til ber at tillaga longu kendar KT-skipanir til okkara viðurskifti, alternativt at menna eina skipan sjálvi.

Til tess er neyðugt at skipa eina verkætlanartilgongd at gera nágreiniliga tørvslýsing sum grundarlag fyri at bjóða út slíka skipan, hvørt tað er at menna eina av nýggjum, ella at keypa og tillaga eina virkandi skipan.

Partur av uppgávuni verður at eftirhyggja allar tær treytir, sum í dag eru í upptøkureglunum til tess at gera skipanina so smidliga sum til ber bæði fyri foreldrini, umsitingina og stovnarnar. Harumframt eisini, hvørjar skipanir og modul skulu ella kunnu knýtast uppí við fyrimuni, herundir fólkayvirlit, faktureringar, hagtøl v.m.

Skipast skal ein verkætlanarbólkur við umboðum fyri avvarðandi deildir (barna- og ungdómsdeildin, snarskivan, kt-deildin, evt. aðrar eftir tørvi), sum saman við verkætlanarleiðara ger uppskot til tørvslýsing at leggja fyri nevnd aftur. Partur av hesum arbeiði verður tí eisini at gera uppskot til broytingar í verandi upptøkureglum og møguliga øðrum mannagongdum, sum hava týdning í mun til ætlaðu endamálini við skipanini.

Mett verður neyðugt at keypa ráðgeving til tilgongd at fáa tørvslýsing og útboðstilfar tilvega. Mett verður, at hetta tekur 3-4 mðr at gera. Kostnaður fyri hetta arbeiðið er mett til kr. 200.000.

Fígging kr. 200.000 kann fáast til vega av ónýttari játtan á 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa til vega tørvslýsing og útboðstilfar til talgilda plássávísingarskipan og til tess at játta kr. 200.000 av kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing ætlað ráðgeving v.m.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Verkætlanarleiðari er settur og arbeiðsbólkur við umboðum fyri snarskivuna, barna- og ungdómsdeildina, fíggjardeildina og dagstovnaleiðarar umboðandi hvørt upptøkuøkið er skipaður.

Ætlan er løgd fyri arbeiðinum, fundir við áhugapartar v.m. Yvirskipað er endamál við talgildu plássávísingarskipanini eitt størri frælsi og betri tænasta til borgaran, sum skjótt kann velja stovnspláss, minni umsiting og neyvari forsagnir um tørv á plássum.

Sambært tíðarætlanini skal tørvslýsing og útbjóðingartilfar verða liðugt 21. apríl 2016.

Umframt hetta er tørvur á einum stýrisbólki við politiskari umboðan at viðgera yvirskipaðar spurningar viðvíkjandi krøvunum til skipanina, herundir broytingar í upptøkureglunum.

Skotið verður upp, at trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin eru umboðaði í stýrisbólkinum aftrat 2-3 politiskum umboðum úr mentamálanevndini. Mett verður, at talan verður um 3-4 fundir í hesum tíðarskeiðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildina mæla mentamálanevndini til at velja politisk umboð í stýrisbólkin.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Vald vóru Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**

Projektbólkurin hevur latið stýrisbólkinum kravfestingina til nýggja barnaansingarskipan. Í stýrisbólkinum vóru Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge, trivnarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og deildarleiðarin á kt-deildini.

Síðani eru 'Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu' endurskoðaðar, har trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin fyri barna-og ungdómsdeildina umframt onnur hava luttkið í arbeiðinum. Í hesum sambandi er gjørt uppskot til meginreglur, har veitt verður plásstrygd, og sum í størri mun er fleksibul í mun til foreldratørv. Sí hjálagt skjal.

Við talgildari skipan kunnu foreldur bóka pláss talgilt og síggja beinanvegin á hvørjum stovni barnið fær pláss. Somuleiðis fáa foreldur svar frá Tórshavnar kommunu beinanvegin, tá ið plássið er bókað í mun til nú, har foreldur fáa svar frá kommununi, tá ið kommunan hevur útlutað plássini. Mett verður somuleiðis, at skipanin gevur gjøgnumskygni í sambandi við at fáa barnaansingarpláss - bæði fyri borgaran og Tórshavnar kommunu - og skynsamari rakstur hjá Tórshavnar kommunu.

Mett verður, at tekur mentamálanevndin undir við meginreglunum fyri plássávising, so er saman við kravspesifikatiónini klárt at bjóða talgildu plássávísingarskipanina út.

Gerast skal vart við, at játtan til endamálið er ikki sett av á fíggjarætlanini fyri 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á barna-og ungdómsdeildini mæla til at taka undir við uppskotinum til broytingar í 'Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu' og við støði í hesum og kravspesifikatiónini at bjóða út talgildu plássávísingarskipanina. Harumframt verður mælt til, at játtan verður fingin til vega.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við prinsippinum í uppskotinum til broytingar í «Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu» og at bjóða út talgildu plássansingarskipanina, og verður málið at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kommunan skipaði fyrr í ár fyri útboði av talgildu bíleggingarskipanini til dagstovnapláss. Inn komu fýra tilboð. Undir viðgerðini gjørdist greitt, at til bar ikki at sammeta tilboðini, tí talan var bæði um tilboð uppá standardskipan og menning av nýggjari skipan. Valt varð tí at avlýsa útbjóðingina.

Umsitingin hevur síðani kannað marknaðin við støði í møguligum útboði av standardskipan burturav. Tað sær ikki út til, at tað eru fleiri bíleggingarskipanir enn tann sonevnda NemPlads (Assemble), ið fleiri bæði størri og smærri danskar kommunur brúka. Skipanin verður harumframt brúkt í øðrum norðurlondum umframt Týsklandi, Frankaríki v.fl.

Tað eru fleiri fyrimunir at útvega eina standardskipan, sum longu er í rakstri og er væl roynd í fleiri londum. NemPlads verður reglugliga dagførd og víðari ment. At skipanin hevur nógvar kundar ger eisini, at skipanin verður støðugt dagførd og víðari ment út frá tørvinum hjá kundunum, og hetta er fevnt av lisenskostnaðinum. Eisini fær kommunan ein veitara við serkunnleika á økinum.

Fyrimunur við hesi skipanini er eisini, at hon skapar fult gjøgnumskygni fyri borgaran og tryggjar umsitingini hagtøl og yvirlit bæði um støðuna her og nú og um plásstørv mánaðir fram í tíðina. Alt hetta ger, at stýringin av plásskapasitetinum økinum kann gerast munandi neyvari. Hetta væntast eisini leysgeva starvsfólkaresursir í miðfyrisitingini.

Vansi kann vera, at veitarin er ikki í Føroyum. Mett verður, at í hesum føri er ikki neyðugt við lokalari support. KT-deildin umsitur fleiri skipanir, har support kemur um netið. Krav um lokalan support kann vera dýrkandi lið, sum haraftrat ikki hevur serkunnleikan til skipanina kortini. Fyri borgaran er tó alt á føroyskum.

Kommunan hevur biðið um óbindandi tilboð uppá at keypa NemPlads-skipanina. Sambært hesum er ein grundupphædd (útveganarkostnaður) uml. kr. 230.000. Árligi lisenskostnaður av skipanini, harundir dagføringar, víðarimenning v.m., er kr. 480.000. Fyrivarnin skal takast fyri hesum, tí talan er um kostnaðaruppskot áðrenn samráðing.

Til skipanina skulu gerast ymsar integratiónir til aðrar sentralar skipanir, fyrst og fremst fólkayvirlitið, kommunalu faktureringsskipanina, Mín boks og Mín lykil. Hetta verður samlað mett at kosta uml. kr. 600.000. Upplæring, kunning og verkseting annars verður mett at kosta kr. 85.000.

Verður skipanin keypt í ár, kann roknast við, at skipanin er klár at taka í nýtslu ætlandi til høvuðsupptøkuna 2018 (tvs. tíðliga um várið).

Miðfyrisitingin ber árligu lisenskostnaðirnar. Eftir at fíggja er sostatt útveganarkostnaðurin, integratión við aðrar skipanir og verkseting við upplæring, kunning v.m. – í alt kr. 915.000.

Mett verður, at til ber at fíggja útveganarkostnaðin uml. kr. 230.000 av verandi fíggjarætlan á grein 3 konta 3215 aðrar útreiðslur, og at restfíggingin til integratiónir og verkseting umleið kr. 685.000 verður at játta av fíggjarætlanini 2018 um so er, at játtan verður sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2018. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2018 er lagt upp fyri hesum á kontu 3215 aðrar útreiðslur.

Fyrisitingin metir skilabest beinanvegin at fara í samráðing um og at keypa NemPlads-bíleggingarskipanina, og eftirfylgjandi at fáa sett arbeiðini við integratión av øðrum skipanum í gongd og verkseting innanfyri ein karm uppá í mesta lagi kr. 915.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa heimild at samráðast um og at keypa NemPlads-skipanina at rinda av kontu 3215 aðrar útreiðslur, og at fígging til tilhoyrandi integratiónir við aðrar skipanir umframt verkseting kr. 685.000 verður fingin til vega á fíggjarætlanini 2018 at játta til endamálið.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 208/17 Áheitanir um at fáa fleiri kommunulæknar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 11.09.2017 | 32/17 | 17/02914-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 195/17 | 17/02914-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 208/17 | 17/02914-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 02.10.2017 | 41/17 | 17/02914-1 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur síðstu tíðina fingið áheitanir frá borgarum, umboðum fyri eldraráðið og øðrum um, at tað er trupult at fáa fatur í lækna, og at tað átti at verið fleiri læknar í kommununi.

Í Tórshavnar kommunu eru í alt 12 ársverk av kommunulæknum, harav ein er í Kollafirði, meðan hinir eru í Tórshavn. Síðsta uppnormering av kommunulæknum í kommununi var í 2011, og við tað høvið leigaði og innrættaði kommunan viðtaluhøli í Miðlon.

Síðani er íbúgvaratalið vaksið við fleiri enn 1.000.

Fyri kortum varð lýst eftir tveimum kommunulæknum. Fýra umsøkjarar vóru, men bert ein tók við starvinum. Hini vildu ikki ganga undir treytirnar, sum kommunan skilur fyrst og fremst snýr seg um, at kommunulæknarnir vilja hava munandi færri borgarar fyri hvørja viðtalu enn teir uml. 1.800-2.000, sum skipanin í dag hevur.

Eisini er komið fram, at onkrir kommunulæknar nú hava sagt upp. Í skrivandi løtu eru tríggir vikarar.

Í almenna rúminum hevur verið frammi, at kommunulæknar vilja niður um 1.500 borgarar fyri hvørja viðtalu, hetta fyri at kunna veita eina grundiga og góða tænastu til øll og samstundis hava tíð til eftirútbúgving v.m.

Um so varð, at hvør kommunulækni hevði í mesta lagi 1.500 borgarar, so skuldu 2-3 kommunulæknar normerast aftrat teim 11 normeringunum, sum eru í høvuðsstaðarøkinum.

Eftir hesum og áheitanunum frá borgarum o.ø. at døma er kommunulæknatrot í kommununi, bæði í mun til ta nú galdandi normering og økta íbúgvaratalið, og í mun til, hvat kommunulæknar meta skilabest í mun til tænastuna.

Tað eru Heilsumálaráðið og Heilsutrygd, sum vara av kommunulæknaskipanini, harundir at áseta kommunulæknanormeringarnar. Kommunan hevur hinvegin ábyrgdina at útvega viðtalur og útgerð.

Heilsumálaráðið arbeiðir við nýskipan av kommnunulæknaskipanini soleiðis, at tænastan verður savnað í heilsudeplar kring landið, og at landið yvirtekur tær ábyrgdir, sum kommunurnar hava í dag í mun til viðtaluhøli og útgerð.

Hóast hesar ætlanir, so stendur eftir øllum døma eftir, at tað mangla kommunulæknar í høvuðsstaðarøkinum. Mett verður tí skilagott, at býráðið borgaranna vegna tekur hetta upp við avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at býráðið heitir á Heilsumálaráðið um at normera nýggj kommunulæknastørv í Tórshavnar kommunu.

**Trivnaðarnevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at gjørd verður ætlan fyri útvegan av fleiri viðtaluhølum, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

## 209/17 Samferðslumálaráðið : Uppskot broyting í koyrikortskunngerðini (prutl) o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.01.2017 | 4/17 | 16/04796-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 186/17 | 16/04796-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 198/17 | 16/04796-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 226/17 | 16/04796-2 |
| 5 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 209/17 | 16/04796-2 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið til hoyringar uppskot um kunngerð um broyting í kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru. Sbrt. uppskoti til § 46 c skulu kommunurnar syrgja fyri frálæru í ferðslureglum og koyrivenjing við lítlum prutli sbrt. lógini um frítíðarundirvísing.

Prutlfrálæran verður løgd til rættis við í minsta lagi 27 skúlatímum, har hvør tími í minsta lagi varir 45 minuttir. Prultfrálæran skal fevna um í minsta lagi 15 skúlatímar í ástøði og fatan av vandaviðurskiftum og í minsta lagi 12 skúlatímar í verkligari koyrifrálæru (venjingarakstur). Sí uppskot til kunngerð í politikkaraportalinum (serliga s. 6 og s. 16).

**Tal av næmingum**
Bólkurin, sum hevur gjørt lógarfyrireikandi arbeiðið metir, at talið av 15-ára gomlum, sum fara at taka lítla koyrikortið til prutl fer at liggja um 300, sum svarar til helmingin av einum meðal árgangi.
Talið av 16-ára gomlum, sum hava tikið prutlkoyrikort hevur seinastu 3 árini verið:
2014 135 næmingar
2015 95 næmingar
2016 93 næmingar
Bólkurin metir, at tá tey ungu eru blivin 16 ár, er tað ikki longur áhugavert at koyra prutl.

**Næmingagjald**
Næmingagjaldið fyri skeiðið er roknað soleiðis:
Byrjunargjald á 360 kr. + 27 tímar á 6 kr. = 522 kr. í næmingagjaldi.

**Kostnaðarlig viðurskiftum millum Kvøldskúlan og Mentamálaráðið**
Undirvísingin kemur undir almenna frítíðarundirvísing sbrt. lógini. Parturin hjá Kvøldskúlan og Mentamálaráðið blívur um 18 næmingar eru á einum holdi:
15 tímar x 292,31 kr. = 4384,65 kr. fyri ástøðiliga partin

36 tímar x 292,31 = 10523,16 kr. fyri venjingaraksturin (6 næmingar á hvørju akstursholdi)

Tilsamans 14907,81 kr., sum skúlin og mentamálaráðið gjalda 50%/50% (7453,91 kr.).

**Skeið til undirvísarar (leiðreglur frá Rådet for Sikker Trafik)**
Neyðugt er at fáa til vega undirvísarar, ið lúka neyðugu krøvini. Skeið til lærarar er hvørt heyst í DK (næsta skeið heystið 2017). Skeiðið er eitt vikuskifti. Leygar- og sunnudag 9.30 – 21.30 og 8.30 – 16.00. Skeiðið kostar 7900 kr. inkl. kost og logi. Afturat hesum skulu leggjast ferðakostnaður og dagpengar (TKUL hava min. 3 undirvísarar). Annar møguleiki er at fáa skeiðshaldara til FO, og vil hetta allarhelst verða bíligari.

**Venjingarakstur**
Skal fara fram á stongdum øki á 40 x 100 metur í uml. 2-4 tímar. Restin á alfaravegi. Í mesta lagi 6 næmingar í senn. Møguleiki hjá næmingunum at hava egið prutl við og skal skúlin lata næminginum loyvi til koyring millum heim og undirvísingarstað. Skúlin fær ymiskar útreiðslur í hesum sambandi t.d.serligir vestar til venjingarakstur, keylir at seta á venjingarbreytina, tráðleyst telesamband millum undirvísara og næmingar, goymslurúm til prutl og útgerð til undirvísaran, trygging v.m. Í fall hetta kemur í gildi er ætlanin at krevja at næmingar hava egið prult.

**Frálæra í 1. Hjálp**
Næmingarnir skulu hava staðið 4 tíma frálæru í 1. hjálp í ferðsluni fyri ungar prutlførarar. Ikki er álagt kommununi at skipa fyri hesari. Aðrir veitarir eru á marknaðinum.

**Eginváttan um heilsu**
Næmingarnir skulu harumframt hava eginváttan um heilsu fyri at sleppa at luttaka, ið teir sjálvir rinda fyri.

Vanlig koyriundirvísing og venjingarakstur er í Føroyum vanliga skipað hjá privatum koyrilærararum. Sum sæst eru fyrst og fremst útreiðslur av at fáa til vega útgerð v.m. meðan næmingagjøldini vilja dekka munandi av undirvísingar- og akstursvenjingarútreiðslunum, tó ikki umsiting o.a..

**Tilmæli**
Trivnðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til hvørt kommunan skal antin
a). Taka jaliga undir við uppskotinum til kunngerð og taka við uppgávuni ella
b). Mótmæla uppskotinum og mæla til at uppgávan verður løgd til vanligu koyriskúlarnar.

**Mentamálanevndin 11. januar 2017:** Samtykt at mótmæla uppskotinum og mæla til at uppgávan verður løgd til vanligu koyriskúlarnar.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur hósdagin.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu viðgerð í mentamálanevndini hevur landstýrismaðurin í samferðslumálum sett í gildi kunngerð um koyrikort. Í mun til uppskotið, ið var til hoyringar eru nakrar broytingar gjørdar. Her serliga, at nú ásett at nú kann bæði vera talan um privatan ella kommunal veitara (§ 46c.).

Umsitingin hevur samskift við Tórshavnar Kvøldskúla um viðurskiftini kring møguliga koyrifrálæru. Sí hjáløgdu frágreiðing.

Kvøldskúlin hevur víst á ávís viðurskifti og fyritreytir fyri at skúlin kann veita koyrifrálæru.

- Sum heild endurrindar Mentanmáláráðið í verandi støðu ikki fult út í mun til skeiðsskánna hjá Kvøldskúlanum. Enn er óvist hvat MMR avsetur til frítíðarundirvísing komandi kalendaraár og tí ikki óhugsandi at alt annað líka at Kvøldskúlin kemur at rinda at kalla allar útreiðslurnar, bæði fyri tól og amboð og undirvísing. Samanlagt verður mett at uppstartskostnaðurin er uml. 50 tkr., um næmingarnir hava egið prutl við. Hartil kemur óvissa viðv. trygging. Hetta verður kannað. Gingið verður út frá at foreldur tryggja prutlið meðan koyrivenjing fer fram og viðv. koyring til og frá bústaðnum til venjing.

- Annað er atlitið til kapping millum Kvøldskúlan og privatar koyrirlærarar. Skúlin hevur kannað viðurskiftini og kann staðfesta at veitararnir ikki eru so áhugaðir, m.a. tí hetta verður sera tíðarkrevjandi, serliga venjingaraksturin, og torført hjá koyrilærarunum at taka uppá seg afturat vanligu koyrifrálæruni. Koyrilærarin var sera ónøgdur við lógina, sum hann helt skuldi verið endurskoða øll sum hon er.

- Viðv. undirvísarum er ein fyritreyt at slíkir fáast til vega. Kommunufelagið hevur møguliga í hyggju at skipa fyri einum skeiði í Føroyum soleiðis at tað samanlagt kann vera bíligari at fáa fleiri undirvísarar til tørvin kring landið. Óansæð vil hetta hava ávísar útreiðslur við sær.

- Í fall tilboðið ferð í gongd hugsar Kvøldskúlin sær at gera samstarv við Eysturskúlan, har tað eru lærarar frá skúlanum, ið undirvísa, at hava goymslu og undirvíngarhøli, umframt brúka skúlagarðin til byrjandi venjingarakstur. Umframt er ætlanin at hava venjingarkastur á parerkingsøkinum við Skúlan á Argjahamri ella við skýlið við ovara vøll í Gundadali.

- Ávís umsiting er eisini av tilboðum og skal tað eisini loysast.

Mett verður fyribils at tilboðið kann fara í gongd í heyst ella við ársbyrjan komandi ár treytað av undirvísarum og fígging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um Tórshavnar kvøldskúli skal fara undir at veita koyrifrálæru til prutl.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið til undanfarna mentamálanevndarfund, ið nevndin verður at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Nevndin vísir til mótmæli hennara frá fundinum 11. januar 2017, men samtykkir at heimila kvøldskúlanum at veita hesa frálæru og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í mentamálanevndina visanti til, at hetta er ein landspolitisk uppgáva, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu:
Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

# 210/17 Gøtunavn til útstykking á matr nr. 1361b við Villingadalsvegin, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 17.07.2017 | 3/17 | 17/02413-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 211/17 | 17/02413-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 210/17 | 17/02413-2 |

**Málslýsing:**
Ein vegur verður gjørdur til eina nýggja útstykking á matr. nr. 1361b við Villingadalsvegin. Nýggi vegurin fær vegatkomu í Villingadalsvegin og verður millum Mækjugøtu og Baraldsgøtu. Kort yvir økið er hjálagt. Ein ringur er teknaður um trøðna, har útstykkingin er.

Gøtunavnanevndin er biðin um at finna eitt hóskandi navn til vegin.

**Gøtunavnanevndin 17. juli 2017:** Nevndin samtykti at skjóta upp, at navnið verður «Liljugøta».

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 211/17 Samstarvsavtala við Fróðskaparsetur Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 204/15 | 15/03535-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 234/15 | 15/03535-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.10.2015 | 216/15 | 15/03535-3 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 02.11.2015 | 35/15 | 15/03535-3 |
| 5 Vinnunevndin | 02.11.2015 | 43/15 | 15/03535-3 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2015 | 53/15 | 15/03535-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 132/15 | 15/03535-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 111/17 | 15/03535-3 |
| 9 Mentamálanevndin | 31.05.2017 | 142/17 | 15/03535-3 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 29.05.2017 | 28/17 | 15/03535-3 |
| 11 Tekniska nevnd | 06.06.2017 | 34/17 | 15/03535-3 |
| 12 Vinnunevndin | 29.05.2017 | 36/17 | 15/03535-3 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2017 | 112/17 | 15/03535-3 |
| 14 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.06.2017 | 27/17 | 15/03535-3 |
| 15 Eldranevndin | 29.05.2017 | 12/17 | 15/03535-3 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 193/17 | 15/03535-3 |
| 17 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 211/17 | 15/03535-3 |

**Málslýsing:**
Endamálið við hesi avtalu er at menna og skipa samstarv millum Tórshavnar kommunu og Fróðskaparsetur Føroya við støði í visjónin hjá Tórshavnar kommunu og endamálinum hjá Setrinum. Ætlanin er í stigum at víðka um samstarvið til eina røð av evnum/økjum. Setrið hevur sum visjón, at tað skulu verða 1500 lesandi á setrinum um 10 ár, móti teimum umleið 800 í løtuni.

Við hesi avtalu verða lunnar lagdir undir eitt langtíðar samstarv við eini røð av perspektivum, ið eru áhugaverd bæði fyri setrið og Tórshavnar kommunu. Í fyrstu atløgu verður tilgongd byrjað viðv. at fáa gjørt eina ætlan fyri eitt universitetskampus og farið undir at leggja ætlanir um onnur ítøkilig samstarvsøkir.

Sí uppskot til avtalu sum hjálagt skjal.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og Mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við, at umsitingin inngongur hjáløgdu avtalu, og at málið fer til kunningar hjá øllum býráðsnevndunum.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í allar nevndir til ummælis.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mælia til at taka undir við avtaluni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og leiðarin á sosialu deild mæla til at taka undir við avtaluni.

**Trivnaðarnevndin 02. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 02. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við avtaluni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við avtaluni.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
**Bakgrund**
Víst verður til mál nr. 15/03535 – Samstarvsavtala við Fróðskaparsetur Føroya - http://setur.fo/fileadmin/user_upload/SSS/PDF-filur/Tidindir/SSS/Samstarvsavtala.pdf -, umframt at í sambandi viðgerð av mál 16/01597 (umsókn um stuðul til granskingaverkætlan) samtykti mentamálanevndin, at umsitingin skuldi koma við tilmæli um at kommunan árliga stuðlar einari PhD-verkætlan at leggja fyri nevndina sum skjótast.

Sum liður í menningini av samstarvinum við Fróðskaparsetrið var 16. november 2016 verkstova í skúlanum í Norðadali við uml. 20 umboðum fyri ymisk starvsøki hjá Tórshavnar kommunu og Fróðskaparsetrinum.

Verkstovan tók støði í at samstarv millum TK og Setrið kann vera innan eina longri røð av evnum og økjum. Nevnast kunnu verkætlanir o.a. innan heilsu- og umsorganarøkið, skúla, mentan, ítrótt&rørslu, námsfrøði, kunningartøkni, býarskipan, burðardygg menning, orku, tøkni, byggitøkni, vinnumenning&íverksetan, burturkast, veitingar, Smartcity o.s.fr.

*Politikkir hjá kommununi*
Innan fleiri økir hevur kommunan samtykt politikkir, har kommunan hevur sett sær ymisk mál. Sum dømi kann nevnast umhvørvispolitikkurin frá 2016. Samstarv við setrið vil í fleiri førum kunna vera við til at stuðla undir og tryggja at settu málini í ymisku politikkunum kunnu náast og fáa virkna.

**Verandi samstarv**
Í verandi støðu er longu samstarv innan eina røð av økjum. t.d. verkætlanir innan heilsu, skúla, námfrøði, umhvørvi v.m.

**Møgulig verkevni/samstarvsøkir**
Á verkstovuni vóru t.d. hesi samstarvsevnini havd frammi: Bygningsregluverk og orka, umhvørvisvernd, spillvatnsviðurskifti, ferðslustýring, smartcity, námsfrøði, fyribyrging, burturkast/endurnýtsla, málmenning- og máltøka, fjarhiti, samskipan innan børn/ung – skúla, eftirmetingar- og nøgdsemiskanningar, skaðadjórsniðurberjan v.m.

**Framtíðar skipan av samstarvi**
Økini kunnu t.d. býtast í fylgjandi tættir:

a). Granskingarverkætlanir
Kann vera talan um alt slag bæði smærri og størri verkætlanir, PhD- ella Post.doc-verkætlanir (sí pkt. b) og til ymiskar kostnaðir. Ofta vildi verið talan um størri ella minni partsfígging frá TK og at TK setir til taks tilfar, tøl, arbeiðspláss og tilfongi av ymiskum slag. Vanliga vilja slíkar verkætlanir verða fyrireikaðar og útintar saman við Fróðskaparsetrinum og evt. øðrum universiteti. TK hevur longu í starvi starvsfólk, ið eru skikkaði til at inngang í og standa fyri verkætlanum saman við uttanhýsis pørtum.

b). PhD-verkætlanir
Ein PhD-verkætlan kostar vanliga umleið millum 1,2 – 1,6 mio.kr. tilsamans (yvir uml. 3 ár). (Tó onkrar innan tøkni við nógvum royndum, kunnu tær vera nakað dýrari). Partfíggingini hjá TK kundi vanliga verið uml. 1/3 av upphæddini. Ein variantur verður ofta nevndur vinnu-PhD, har ein PhD-lesandi verður settur í eitt starv innan ávíst øki hjá TK við atliti til at fremja eina verkætlan meiri burturav hjá TK. Vanliga vil vera um partsfígging frá TK (50%) og restin frá uttanhýsis fígging. Til ber antin at søkja eftir studentum til longu orðaðar verkætlanir ella at søkja saman við einum studenti. Berandi lutirnir í eini slíkari verkætlan er verkætlanarlýsingin (protokollin), vegleiðararnir, fíggingarleistur og studenturin.

c). Praktikkuppihald
TK virkar longu sum praktikkstað fyri lesandi innan sjúkrarøktarfrøði, stjórnmálafrøði, verkfrøði vm. Hugsanin er at hetta kann víðkast til onnur økir við. Eitt nú fíggjardeild, heilsuøkið, mentamáladeild, Barna- og ungdómsdeild, KT-deild v.m. Ber sum heild ikki stórvegis útreiðslur við sær, tí tey lesandi fáa studning og fáa ikki beinleiðis løn fyri prakktikkuppihaldið.

d). Høvuðsuppgávur o.l. hjá lesandi
Er longu vanligt í dag. Kann helst mennast meiri. Krevur at deildir/eindir/stovnar eru klárar at taka ímóti og eisini hugsa at orðað verkevni v.m. Kundi verið hóskandi at gjørt eitt torg á heimasíðuni har eindir lýsa við møguligum evnum. Er ikki talan um veita løn, men heldur evt. fígging av møguligum tilfari, ferðing o.l.

e). Virkis- og stovnsvitjanir
Í sambandi við ymisk øki er ofta viðkomandi at tey lesandi kunnu koma á vitjan hjá eindum og stovnum við atliti til at fáa nærri innlit. Krevur ikki annað enn at stovnarnir eru blíðir og hava fyrireika seg til at hava framløgur. Ynskiligt var at stovnar meiri proaktivt bjóðaðu til vitjan t.d. við upplýsingum á heimasiðu v.m.

f). Førleikamenning/skeið
Setrið hevur eina longri røð av serkønum starvsfólki, sum í fleiri førum kundu verið viðkomandi í sambandi við skeið, førleikamenning. Skotið verður upp at hesin møguleikin verður tikin við í ráðleggingini hjá Starvsfólkadeildini og annars gjørt vart við tað í ymisku leiðarabólkunum.

g). Karmar fyri setrið/Tórshavn sum lestrarbýur
Er ein strategisk raðfestingin hjá kommununi. TK er longu partur av nøkrum tilgongdum (Dømi: Hýsing í kommunalum hølum og Finsen). Hildið verður fram við at fáa lýst og framt málið.

h). Vitanarútbreiðsla, -miðling, -tiltøk
Skotið verður upp at TK og Setrið leggja seg eftir í felag at finna høvi til at miðla vitan til almenningin t.d. tiltøk í hølum hjá TK og annars í mun til skúlar, dagstovnar v.m. Ítøkiliga er tað einstøku deildirnar, ið finna hóskandi evnir saman við avvarðandi lektarum á setrinum (dømi: Umhvørvisvikan).

i). Vinnumenning/íverksetan
Hugskotið er strategiskt átak hjá TK innan vinnumenning og íverksetan. Skotið verður upp at gera eina samstarvsskipan har Hugskotið inngongur at gera skeið í evninum, ið skal vera møguligt at velja hjá flestu næmingum á setrinum.

j). Tórshavn sum ráðstevnubýur
TK vil viðvirka til at tilfongi hjá TK inngongur til í enn størri mun at gera tað møguligt hjá Setrinum at fyriskipa altjóða ráðstevnur í Tórshavn, serliga uttanfyri háárstíð.

**Fíggjarliga avleiðingar**
Í flestu førum vil samstarvið innibera at TK skal veita lutvísa fígging. Hetta kann í nøkrum førum vera gjørt innan verandi karmar og raðfestingar og í øðrum førum má serlig játtan útvegast. Royndirnar at fáa uttanhýsis fígging er nakað sum má mennast stigvíst. Sum heild eru rímiliga góð útlit til at fáa fígging frá Granskingarráðnum. Hartil koma aðrir møguleikar.

**Granskingarpolitikkur**
Mælt verður til í 2017/18 at fáa orðað ein granskingarpolitikk sum greinar nærri mál- og stevnumið fyri gransking í kommununi.

**Atgongd til dáta**
Í verandi støðu hevur umsitingin og stovnar eina longri røð av dátugrunnum, ið kunnu vera viðkomandi fyri granskingarverkætlanir. Kommunan leggur seg eftir at gera hesar tøkar til verkætlanir innanfyri galdandi lógarkarmar v.m. innan persónsvernd v.m.

**Tilmæli**
Stjórn og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at viðgera tilmælini við atliti til málið verður sent til ummælis í øllum nevndum og at umsitingin síðani hareftir til ein komandi fund kemur við endaligum tilmæli.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til ummælis í øllum nevndum.

**Trivnaðarnevndin 29. mai 2017:** Nevndin ynskir, at kommunan og Fróðskaparsetrið leggja dent á at menna sosiala gransking, t.d. innan barnavernd, trivna millum ung v.m.

**Vinnunevndin 29. mai 2017:** Samtykt at taka undir við samstarvsavtaluni.

**Eldranevndin 29. mai 2017:** Samtykt at taka undir við samstarvsavtaluni og vísa á týdningin eisini at granska á eldraøkinum.

**Mentamálanevndin 31. mai 2017:** Samtykt at taka undir við samstarvsavtaluni.

**Tekniska nevnd 06. juni 2017:** Samtykt at taka undir við samstarvsavtaluni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2017:** Samtykt at taka undir við samstarvsavtaluni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. juni 2017:** Samtykt at taka undir við samstarvsavtaluni.

**Ískoyti:**
Greiningini av, hvussu samstarvið við Setrið og gransking sum heild kann skipast og mennast hevur verið til ummælis í Trivnaðarnevndini, Vinnunevndini, Eldranevndini, Mentamálanevndini, Teknisku nevnd, Byggi- og býarskipanarnevndini og Náttúru og umhvørvisnevndini. Allar nevndirnar taka undir við uppskotinum.

Næsta stig vil vera at viðkomandi deildir gera ítøkilig uppskot um samstørv við Setrið og sum kunnu vera grundarlag undir eitt nú umsóknum til Granskingarráðið. Ítøkiliga verkætlanir vilja koma til viðgerðar í nevndunum so hvørt tær taka seg upp.

**Tilmæli:**
Stjórn og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja uppskotið til framtíðar skipan av samstarvi við Setrið. Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Samtykt at Gunnvør Balle fór av fundi meðan málið var viðgjørt.

Einmælt samtykt.

# 212/17 Skoytubreytin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 394/16 | 16/04312-1 |
| 2 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 292/16 | 16/04312-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 305/16 | 16/04312-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 68/17 | 16/04312-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 187/17 | 16/04312-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 168/17 | 16/04312-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 16/04312-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 227/17 | 16/04312-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 217/17 | 16/04312-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 212/17 | 16/04312-1 |

**Málslýsing:**
Skoytubreytin var fyrstu ferð sett upp í 2011 og hevur síðani verið opin uml. 2 mánaðir á hvørjum ári kring ársskiftið. Ymiskt er, hvussu tað hevur hilnast við rakstrinum, men sum heild góð undirtøka.

Á kontu 5716 Skoytubreyt er ikki tøk fígging til at breytin letur upp hetta tíðarskeiðið.

Útgreining viðv. tørvi á eykajáttan í sambandi við uppseting, rakstur og niðurtøku av skoytubreyt – desember 2016 til og við januar 2017.

Farna tíðarskeið var dagligi raksturin útveittur til privatan veitara. Harumframt eru ymiskar útreiðslur í sambandi við flutning, tilfar vm. Hallarumsitingin (Ítróttaanlegg) hevur ábyrgd av anlegginum. Inntøkurnar frá skoytubreytini fara til kontuna.

Leysliga mett er talan um fylgjandi útreiðslur og inntøkur:

Rakstraravtala, uppseting o.a. kr. 270.000 fyri tíðarskeiðið.

Ravmagnsútreiðslur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.
Atgongumerkjainntøkur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.

Samlaður fíggjartørvur fyri tíðarskeiðið umleið kr. 270.000 um óvissa viðvíkjandi inntøkum og ravmagni umleið kr. 30.000. Í alt kr. 300.000.

Ikki er endaliga avrátt viðvíkjandi staðseting.

Standurin og tøknin á verandi skoytubreyt er um at vera ótíðarhóskandi, men verður mett at hon kann roynast einaferð enn.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at játta á kontu 5716 Skoytubreyt kr. 300.000 fyri 2016 at fíggja av kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Skoytubreytin er í ringum standi (bæði kølianlegg og slangur), og verður ikki mett ráðiligt at halda fram við verandi anleggi. Mett verður, at hon eigur at verða burturbeind nú, tí goymsluplássið á Hjalla kostar Ítróttaranleggum einar 65 tkr. um árið.

Um ynski er framhaldandi at hava eina skoytubreyt, ber til at velja millum eina líknandi tøkni við nýggjum og betri kølianleggi ella eina sonevnda íslíkisbreyt (kunstísbreyt). Ein breyt á 20 m x 30 m (uml. 600 $m^2$) og annað tilhoyr, kostar leysliga mett (ref. prísir) uml. 1.000 tkr. Niðanfyri  er leinkja til íslíkisbreyt
https://drive.google.com/file/d/0B44uDuymJfBeeTEtRmdiVWx5Y0E/view

Peningur er ikki settur av til endamálið, og má um so er raðfestast í 2017 ella seinni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at Ítróttaanlegg kann burturbeina gomlu skoytibreytina.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Ynski er sett fram at fáa eina skoytubreyt aftur í býin til komandi vetur. Í hesum sambandi eru tveir høvuðsspurningar at greiða.

Tann fyrri er ein møgulig staðseting, ið eisini ger av, hvussu stór breytin kann vera. Farnu tvey árini hevur hon staðið á Vaglinum, og áðrenn tað nøkur ár í garðinum við Finsen (fyrrv. kommunuskúlagarðurin) og á Skálatrøð. Fylgjandi møguleikar eru hugsandi til komandi staðseting.

- Vaglið
- Skálatrøð
- Í Gundadali við Gundadalshøllina (tó har er ein avbjóðing viðv. plássi og atkomu í sambandi við komandi útbygging av Tórsvølli)
- Í Gundadali á parkeringsøkinum við Ovara vøll

Á flestu av hesum støðunum vilja vera ávísar ella størri avbjóðingar. Harumframt er spurningur, hvat umhvørvi breytin skal vera partur av. Farnu árini hevur breytin vanliga verið opin í desember og januar á hvørjum vetri.

Annar spurningurin er kostnaðurin. Fyribils metingar eru, at ein vanlig breyt við ektaðum ísi, umframt ymiska útgerð vil kosta umleið 1.000 tkr. og somuleiðis ein íslíkisbreyt. Fremsti fyrimunurin við íslíkisbreyt er, at hon ikki brúkar streym, men kannað eigur at verða, hvussu ein slík roynist ella upplivist um so er, at ynskið er at útvega eina slíka.

Umframt løgukostna er eisini neyðugt við ávísari nettojáttan til raksturin, tí higartil hava gjøldini ikki dekkað allan raksturin og uppseting, tó so, at helst ber til at hækka gjøldini nakað uttan at tað vil ávirka eftirspurningin hjá brúkarunum stórvegis.

Skal nýggj breyt verða tøk at taka í nýtslu síðst í november, skal berast skjótt at.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at taka støðu til, um nýggj skoytubreyt skal fáast til vega, og um so er, at taka støðu til fíggingina av hesum
b) at umrøða møguliga staðsetingar og beina tann spurningin til byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við at fáa til vega nýggja skoytibreyt, at staðseta hana í miðbýnum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tað eru avmarkaðir møguleikar í miðbýnum í mun til staðseting til skoytubreyt og støðd.

Í sambandi við framtíðar býarplanlegging av býnum, kundi skoytubreytin verið hugsað inn sum ein liður í eini langtíðarloysn, t.d. sum ein partur av torginum í Vágsbotni ella á Skálatrøð, tá Tjóðleikhúsið gerst aktuelt. Staðsetingin á Vaglinum seinnu árini hevur eisini verið væl móttikin av brúkarum.

Niðanfyristandandi uppskot leggja upp til skoytubreytir, ið lættliga kunnu setast upp og takast niður aftur. Staðsetingar kunnu roynast, so funnið verður fram til bestu langtíðarloysnina at staðseta eina skoytubreyt, antin um talan er um eina loysn í miðbýnum ella í sambandi við eina møguliga multihøll.

Í sambandi við spurningin um møguliga staðseting av skoytubreytini, er býarskipanardeildin komin fram til tríggjar møguleikar, umframt at víst verður á nøkur alternativ, sí kortskjal journal nr. 16/04312-7:

**Vágsbotnur**
Torgið í Vágsbotni er ein liður í miðbýarætlanini, og tað er væl hugsandi, at ein skoytubreyt kann gerast ein støðug (vetrar)loysn í sambandi við eina dagføring av verandi skipan á økinum. Økið liggur í hjartanum í miðbýnum og við trappuni sum áskoðarpláss og kaffistovunum út eftir bryggjukantinum er hetta ein eyðsæð staðseting í mun til býarplanleggingina og býarlívið. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 $m^2$, og kundi staðsetingin verið roynd sum ein fyribils verkætlan í sambandi við dagføringina av verandi skipan á økinum.

**Vaglið**
Her hevur skoytubreytin staðið áður, og hevur tað riggað væl, hóast hendinga mótmæli er komið um at handlar missa viðskiftafólk. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 $m^2$.

**Við Bókhandilin**
Triðja uppskotið er at staðseta eina skoytubreyt millum Tinghúsvøllin og Bókhandilin. Henda loysnin er ikki roynd áður, men økið liggur eisini í hjartanum í miðbýnum og kann virka fyri, at skoytubreytin gerst sjónlig í býarmyndini og tískil virkar dragandi fyri fólk til gongu. Pláss er fyri eini skoytuberyt áleið 250-350 $m^2$.

Harafturat ber til at vísa á nakrar alternativar staðsetingar:

- **Skálatrøð,** óavmarkað stødd. Uml. 400 $m^2$
- **Frúutrøð,** økið liggur ikki í miðbýnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 500 $m^2$
- **á Glasheyggi,** ikki mitt í býnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 400 $m^2$

Í øllum uppskotunum omanfyri skulu atlit takast til ferðslu og parkering.

Viðmerkjast skal, at øll uppskotini á kortskjalinum eru vegleiðandi og kunnu tillagast økið.

**Skjøl:**
Uppskot um staðseting til skoytubreyt 16/04312-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja staðsetingina í Vágsbotni ella at vísa á eina av útvaldu staðsetingunum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at fáa staðsetingina í Vágsbotni betur lýsta, at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti.**
Gjørdar eru ávísar forkanningar viðv. møguleikum fyri keypi og leigu av eini skoytubreyt við ísi. Ymiskar tekniskar loysnir eru møguligar. Eitt nú við gummislangum ella alurørum í sjálvari ísskoytubreytini, umframt kølikompressara. Aðra útgerð til breytina eigur Ítróttaanlegg longu frá undanfarnu skoytubreyt. Veljast kann eisini at keypa bandar, ið eru gjørdir til endamálið ella brúka ta sjálvgjørdu loysnina, ið Ítróttaanlegg hevur gjørt og brúkt higartil. Ávís sparing er í tí.

Vegna knappa tíð verður mett frægast at leiga eina skoytubreyt (stødd umleið 20 m x 25 m) og kunnu so fyrireikingar verða gjørdar til at fyrireika keyp av eini skoytubreyt til sesongina 2018/19. Til ber bæði til at keypa eina nýggja breyt og brúktar.

Fyri leigu av eini breyt, umframt flutning, tilgerð av lendinum undir breytini og uppseting v.m. verður mett neyðugt við eini játtan á uml. 600 tkr. Roynt verður at fáa til vega tvey tilboð uppá leigu av skoytubreyt.

Keyp er eisini møguligt og krevur tá eina játtan á tils. umleið 2 mio.kr.

Fígging er sum er ikki tøk á konto 5716 Skoytubreytin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at leiga eina ísskoytubreyt til sesongina 2017/18 og í hesum sambandi játta kr. 600.000 til kontu 5716 skoytubreyt.

Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til játta kr. 600.000 av kontu 20910 aðrar inntøkur til kontu 5716 skoytubreyt

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, mæla til at skoytubreytin heldur verður keypt enn leiga og at finna eina endaliga staðseting til eina framtíðar skoytubreyt í miðbýnum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum i mentamálanevndini og vísir á, at leigan av skoytubreyt ikki er boðin út.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við minnilutanum í mentamálanevndini 28. september 2017, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

Ímóti atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

# 213/17 Vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 10.11.2014 | 27/14 | 14/00949-2 |
| 2 Økisnevndin | 03.11.2014 | 26/14 | 14/00949-2 |
| 3 Økisnevndin | 02.11.2015 | 21/15 | 14/00949-2 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 23.11.2015 | 17/15 | 14/00949-2 |
| 5 Økisnevndin | 11.01.2016 | 2/16 | 14/00949-2 |
| 6 Økisnevndin | 07.03.2016 | 3/16 | 14/00949-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 102/16 | 14/00949-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 145/16 | 14/00949-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 173/16 | 14/00949-2 |
| 10 Kaldbaksnevndin | 27.04.2016 | 6/16 | 14/00949-2 |
| 11 Økisnevndin | 02.05.2016 | 9/16 | 14/00949-2 |
| 12 Kollafjarðarnevndin | 09.05.2016 | 10/16 | 14/00949-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 197/16 | 14/00949-2 |
| 14 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 31.05.2016 | 6/16 | 14/00949-2 |
| 15 Økisnevndin | 29.08.2016 | 14/16 | 14/00949-2 |
| 16 Nólsoyarnevndin | 30.08.2016 | 7/16 | 14/00949-2 |
| 17 Hvítanesnevndin | 05.09.2016 | 3/16 | 14/00949-2 |
| 18 Kollafjarðarnevndin | | | 14/00949-2 |
| 19 Hest/Koltursnevndin | 08.09.2016 | 8/16 | 14/00949-2 |
| 20 Kaldbaksnevndin | | | 14/00949-2 |
| 21 Økisnevndin | 16.01.2017 | 2/17 | 14/00949-2 |
| 22 Økisnevndin | 13.02.2017 | 8/17 | 14/00949-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 43/17 | 14/00949-2 |
| 24 Økisnevndin | 03.04.2017 | 9/17 | 14/00949-2 |
| 25 Økisnevndin | 15.05.2017 | 11/17 | 14/00949-2 |
| 26 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 14/00949-2 |
| 27 Økisnevndin | 11.09.2017 | 17/17 | 14/00949-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 203/17 | 14/00949-2 |
| 29 Kollafjarðarnevndin | 16.10.2017 | 4/17 | 14/00949-2 |
| 30 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 213/17 | 14/00949-2 |

## Málslýsing:

Bygdahegn Kollafjørður (vetrarfriðing)

Tórshavnar kommuna er farin í gongd við arbeiðið, at fáa sett upp bygdahegn í øllum bygdunum í kommununi. Talan er um, at fáa seyðin út úr bygdunum so at tilber, at fríðka um bygdina og skapa betri trivna millum fólk. Arbeitt verður við hesi ætlan í Nólsoy og nú er planurin at byrja upp á Kollafjørð.

**Tilmæli:**
Fyristingarstjórin og økissamskiparin mæla til, at økisnevndin tekur undir við at hetta arbeiðið byrjar nú og at nevndin saman við umsitingini tekur stig til at tosa við teir eigarar og Landsverk, sum varða av økinum rundan um Kollafjørð.

**Økisnevndin 03. november 2014:**

**Ein meiriluti:** Halla Samuelsen, Jákup Dam, Sigrún Mohr og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó við tí fyrivarni at tað ikki skal hava nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Økissamskiparin kunnaði um at arbeiðið um vetrarfriðing í Kollafirði fer í gongd nú.

**Økisnevndin 02. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 23. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Økisnevndin 11. januar 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í sambandi við tilgongdina, at vetrarfriða Kollafjørð er nú gjørd ein útrokning, sum vísir eitt estimat fyri hvat kommunan skal gjalda til hegning og avloysing av vetrarbiti fyri hagarnar á Signabø og Oyrareingir. Í samráð við bøndirnar er løgd ein linja fyri hvussu hegningin skal skipast. Síðani er roknað út hvussu nógv lendi bøndirnir missa í sambandi við vetrarbit.

| **Hegn.** | **metrar** | **Kr./m** | **íalt** |
|---|---|---|---|
| Signabøur | 1.780 | 150 | 267.000 |
| Oyrareingir | 3.740 | 150 | 561.000 |
| | | | |
| **Mist vetrarbit:** | **$M^2$** | **$kr/m^2$** | |
| **Signabøur** | | | |
| Velt | 57.697 | 4,80 | 276.946 |
| ikki velt | 25.149 | 0,70 | 17.604 |
| **Oyrareingir** | | | |
| Velt | 0 | 4,80 | 0 |
| ikki velt | 0 | 0,70 | 0 |
| Rulluportur | 1 | 70.000 | 70.000 |
| Annað | | | 50.000 |
| | | | 1.242.550 |

Í uppgerðini er brúkt 150,- fyri hegning pr. metur. Tvs. 35,- kr. fyri tilfarið og 115,- fyri hegningina pr. metur. Í hesi útrokning er ikki tikin støða til hvat viðlíkahald av hegninum í framtíðini kemur at kosta kommununi.

**Økisnevndin 07. mars 2016:** Samtykt at beina málið í figgjarnevdina til ummælis.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostnað og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at umsitingin skal fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostna og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi er ynskiligt, at fáa eina ábending frá kaldbaksnevndini um tørvin á vetrarfriðing í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 27. april 2016:** Staðbundna nevndin hevur umrøtt uppskot frá umsitingini um vetrarhegn í Kaldbak. Avtalað varð, at hava ein fund við festararnar í Kaldbak um hegnlinju.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingir og Signabø er fylgjandi samlað uppgerð gjørd yvir hvat hetta umleið kemur at kostað kommununi:

| | | |
|---|---|---|
| Longd hegn: | 16.800 m. | 1.512.000 |
| Rulluportur: | 2. stk. | 300.000 |
| Avloysing vetrarbit | 168.700 m2 | 809.760 |
| Árligt viðlíkahald | | 100.800 |
| Tilsamans | | 2.621.760 |

Prísurin fyri hegn er settur til 50,-/m. til hegn, pelar o.a. og prísurin fyri uppsetan er settur til 40 kr./m. Rulluportur eru sett til 150.000,- pr. stk. við ísetan. Avloysing fyri vetrarbit er sett til 0,70 kr./m2 fyri ódyrkað og 4,80 kr./m2 fyri dyrkað lendi. Árligt viðlíkahald er sett til 6 kr. pr. metur og tá er avskrivingin sett til 30 ár.
Metingin er gjørd við støði í fylgjandi fyritreytum hjá umsitingini:

- Hegnføringin er ikki gjørd í samráð við eigarar og bøndir á staðnum
- Støða er ikki tikin til um verðandi hegn kann nýtast, har tað stendur frammanundan
- Kostnaður fyri rulluportur er mettur til 150.000 kr. við ísetan, undantikið á landsvegi
- Avloysing av vetrarbit er mett, men um tað eru ivamál, kann Matrikulstovan gera neyvar mátingar. Búnaðarstovuni tekur endaliga avgerð um avloysing av vetrarbiti á almennari festijørð, saman við festaranum
- Ymisk jarðarstykkir, sum kommunan og onnur hava keypt mugu kannast nærri um avloysing fyri vetrarbit er goldin.
- Árliga viðlíkahaldið er sett til 6,-. kr/metur

Út frá hesum fortreytum kann sigast, at samlaði kostnaðurin upp á 2,6 mill fyri vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingjum og Signabø kann blíva munandi lægri, um størri ella minni strekkir av hegni kunnu endurnýtast og um avloysingin av vetrarbitið ikki blívur so umfatandi sum mett er.

**Økisnevndin 02. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá heildarætlanini.

**Kollafjarðarnevndin 09. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Útsett.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 31. maj 2016:** Málið varð umrøtt.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at fara undir eina heildarætlan at vetrarfriða alla kommununa og at peningur til arbeiðið verður játtaður í sambandi við fíggjarætlanina 2017.

**Økisnevndin 29. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Nólsoyarnevndin 30. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 05. september 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hest/Koltursnevndin 08. september 2016:** Kunnað varð um málið. Ynski frá staðbundnu nevndini í Hesti at arbeiða við vetrarfriðing í Hesti.

**Økisnevndin 16. januar 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Á síðu 5, fjórsíðsta reglubrotið í samgonguskjalinum frá 30. decembur 2016, stendur «vetrarfriðing verður framd, har ynski er um tað». Um hesin málsetningur skal náast er átroðkandi, at peningur verður settur av til verkætlanina. Hetta kann gerast við einari passandi upphædd um árið - í nøkur ár. Ein leyslig meting vísir, at talan er um 6 og 9 mio. fyri alla verkætlanina - alt eftir hvussu nógvar bygdir ynskja vetrarfriðing.

Fyri at fáa gongd á arbeiðið, har Kollafjørður er peikaður út sum mest átroðkandi, bæði fyri trivna og trygd, er tað sera umráðandi, at peningur verður settur av til verkætlanina soleiðis, at umsitingin kann fara undir arbeiðið at tosað víð teir bøndir og privat fólk, sum eiga lendið í Kollafirði, ið verða rakt av einari vetrarfriðing.

Um peningur verður játtaður og áhugi er í politiska valdinum til hesa verkætlan, so er eingin forðing fyri at fara undir, at fáa tær formellu avtalirnar upp á pláss og síðani at nýta ein part av summarinum og heystinum til at seta skjøtul á sjálva hegningina.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til hesa verkætlan og síðani, um meirluti er fyri tí, sendir málið víðari til fíggjarnevndina til støðutakan.

**Økisnevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at fara undir eina tilgongd at vertrarfriða økini í kommununi og at peningur verður settur av í eini langtíðaríløguætlan.

**Ískoyti:**

Alt bendir nú á, at peningur verður settur av til vetrarfriðing av bygdunum í Tórshavnar kommunu. Alt eftir hvussu stór upphæddin verður, so er tað neyðugt, at økisnevndin tekur støðu til hvønn leist, umsitingin skal leggja fyri dagin, í hesum máli.

Talan hevur verið um, at umsitingin bjóðar umboðum fyri hagapartin Heimara Helvt í Nólsoy til fundar, fyri at fáa gjørda eina endaliga avtalu um vetrarfriðing av bygdini. Í Nólsoy. Næstan øll hegningin er liðug og manglar tí bert ísetan av tveimum rulluportrum.

Eisini er Kollafjørður nevnd, sum ein bygd har vetrarfriðing er alneyðug – bæði tá ið hugsað verður um trygd á vegunum og trivnaðinum í bygdini.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til ein raðfesting av bygdunum.

**Økisnevndin 03. apríl 2017:** Nevndin samtykti at gera eina raðfesting soleiðis at byrjað verður í Nólsoy og annars lýsa nærri hvussu viðlíkahald er skipað í øðrum kommunum.

**Ískoyti:**
Økissamskiparin kunnar um gongdina í málinum.

**Økisnevndin 15. mai 2017:** Kunnað varð um um málið og økissamskiparin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**

**Bygdahegn í Kollafirði**
Í sambandi við at Tórshavnar kommuna hevur sett 1 mió. kr. av til vetrarfriðing av bygdunum í 2017. Umsitingin hevur á fundi við avvarðandi festarar og eigarar hava avtalað eina mannagongd og ætlan fyri uppsetan av bygdahegninum. Samráðst verður við avvarðandi bóndir og privatar eigarar um avtalur, um víddir, avloysing og gjøld fyri miss. Hetta er treytað av, at peningur verður játtaður til framhald.
Ætlanin er nú, at seta skjøtul á arbeiðið við at stiga frá norðara enda í bygdini og heim til skúlan. Talan er um uml. 3.500 m., og við einum eindarprísi upp á 100 kr. pr. m., sum tilboð er givið uppá, so er talan um 350 túsund krónur.

Tá ið peningurin er játtaður, verður biðið um tilboð frá trimum veitarum upp á arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 350.000 av konto 6210.

**Økisnevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 350.000 av konto 6210 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 214/17 Parkeringsøki millum MBM og Hoyvíkshøllina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.12.2016 | 273/16 | 16/04071-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 48/17 | 16/04071-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 183/17 | 16/04071-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 205/17 | 16/04071-3 |
| 5 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 214/17 | 16/04071-3 |

**Málslýsing:**
Tekniska fyrisiting hevur fingið áheitan frá MBM, um loyvi at gera parkeringsøki millum Hoyvíkshøllina og MBM til teirra starvsfólk. Sí tekningar frá MBM.

Tað er Tórshavnar Kommuna, sum er eigari av størsta partinum av umrødda øki matr. nr. 54-138a og vegøki. MBM bjóðar sær til at gera parkeringsøki, og um áhugi er fyri tí, so kundi MBM borið kostnaðin av arbeiðinum, móti at fingið loyvi til at brúkt økið í dagtímunum, sum parkeringsøki hjá starvsfólki teirra, og eftir arbeiðstíð og í vikuskiftinum, tá MBM er stongt, kann kommunan brúka økið sum vanligt parkeringsøki til t.d. áskoðarar í Hoyvikshøllini.

Býarskipanardeildin metir, at inntrivið í náttúruna er ov stórt við verandi ætlanum og ræður tí til, at parkeringsøkið verður stytt við uml. 8 metrum. Sí hjáløgdu tekning (tað reyða økið skal ikki byggjast á). Hendan tillaging fer at avmarka parkeringsøkið frá 21 til uml. 18 parkeringspláss.

Býarskipanardeildin hevur haraftrat ráðført seg við Bjartur Mortensen á Løgdeildini og Marius Müller á Byggi- og Umhvørvisdeildini um hvør loysn er skilabest at taka, um MBM skal keypa lendið ella gera parkeringsøki á kommunalum lendi, so parkeringsøkið lutvíst verður til almenna nýtslu.

Eftir at hava kannað, hvussu verandi parkeringsøki hjá MBM, og onnur parkeringsøkir hjá ymiskum fyritøkum framvið Vegnum Langa sæst, at í fleiri førum eru parkeringsplássini á økinum hjá Tórshavnar Kommunu, sum er avsett til veg, sí tekning nr. 16/04071-5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at MBM fær loyvi at gera parkeringsøki til uml. 18 básar sambært tekning nr. **16/04071-4** á matr. nr. 1bk hjá MBM og á matr. 138a og 138k hjá Tórshavnar Kommunu.

MBM ber kostnaðin av gerð av parkeringsøkinum, og kann brúka parkeringsplássini í dagtímunum til starvsfólkini, og uttanfyri arbeiðstíð verður parkeringsøkið til almenna nýtslu.
MBM skal senda nýggjar tekningar við tilráddu broytingunum av parkeringsøkinum sambært Tekning nr. 16/04071-4, sum Býarskipanardeildin og Byggideildin skulu góðkenna, áðrenn endaligt loyvi kann gevast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

MBM hevur sent umsitingini nýggjar tekningar, 16/04071-12, eftir tilráðingum um at broyta parkeringsøkið til 17 parkeringsbásar. Endalig góðkenning av tekningunum skal gerast í samráð við teknisku deild. Harafturat hevur umsitingin orðað eina brúksavtalu, sí skjalið16/04071-11, sum skal góðkennast og undirskrivast av MBM og Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til, at MBM fær loyvi at gera parkeringsøki til 17 básar sambært brúksavtaluni eftir góðkendum tekningum á matrikul 1bk hjá MBM og á matrikul 138a og k hjá Tórshavnar kommunu og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí treyt, at grøni geirin verður varðveittur og plantaður.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 215/17 Útstykking í Nólsoy - nevndarsamtyktir - broyting av byggisamtykt (2006-1856)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 125/15 | 14/01828-52 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 153/15 | 14/01828-52 |
| 3 Nólsoyarnevndin | 08.09.2015 | 6/15 | 14/01828-52 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 190/15 | 14/01828-52 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.10.2015 | 217/15 | 14/01828-52 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 23/16 | 14/01828-52 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 171/17 | 14/01828-52 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 139/17 | 14/01828-52 |
| 9 Nólsoyarnevndin | 20.06.2017 | 3/17 | 14/01828-52 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 161/17 | 14/01828-52 |
| 11 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 42/17 | 14/01828-52 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 179/17 | 14/01828-52 |
| 13 Nólsoyarnevndin | 18.09.2017 | 6/17 | 14/01828-52 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 177/17 | 14/01828-52 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 201/17 | 14/01828-52 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 184/17 | 14/01828-52 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 218/17 | 14/01828-52 |
| 18 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 215/17 | 14/01828-52 |

**Málslýsing**:
Av tí at fólk í Nólsoy hava spurt seg fyri hjá kommununi um grundstykki og hava fingið at vita, at eingin útstykking verður framd í bræði, vilja staðbundnu limirnir hava greitt at vita, hvørjar ætlanir kommunan hevur hesum viðvíkjandi.

Eisini vilja teir vita, hvussu er við ætlanini um randarhús og um til ber at keypa grundstykki uttan fyri hesa ætlan.

**Nólsoyarnevndin 13. juni 2006:** Nevndin mælir plandeildini til at gera eina útstykkingarætlan fyri økið, sum liggur oman fyri barnagarðin.

Kommunan eigur lendið, matr. nr. 159e.

**Ískoyti:**
Málið liggur í byggi- og býarskipanardeildini.

**Nólsoyarnevndin 12. september 2006:** Kunna varð um, at málið kemur fyri á fyrst komandi fundi í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Í byggisamtyktini fyri Nólsoy, kapittul IV § 18. øki A:Sethús stendur:

*Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggja ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 $m^2$, tó í minsta lagi 320 $m^2$ fyri serhús (einhúskishús) og 260 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum.*

*Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at útstykkingverður samtykt sambært korti nr. 2006-1856/3 og send út til projekteringar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað projekteringina av útstykkingini út. Sí hjálagt yvirlit yvir innkomin tilboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin koma við tilmæli til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 15. januar 2007:** Nevndin samtykti at mæla til at taka av lægsta tilboðnum frá HMP konsult.

Harumframt mælti nevndin til at leggja málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og leggja út fyri kostnaðin.

**Ískoyti:**
HMP hevur gjørt projekt til útstykkingina og gjørt útbjóðingartilfar. Aftaná projektgransking er projektið klárt at bjóða út. Sambært fyribils kostnaðarmeting verður samlaði kostnaðurin:

Við neyðugar vegaføring: 2.447.374 kr. u/mvg svarandi til 2.600.334 kr. v.mvg. Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 600,00.
Við samlað vegaføring:3.550.766 kr. u/mvg svarandi til 3.772.688 kr.v mvg.
(Sí skjal nr.1 og 2). Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 850,00.

**Tilmæli:**
Býararkitektin og tekniski stjórin mæla til at velja uppskot nr.1 og at bjóða arbeiðið við útstykkingini út sum skjótast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, soleiðis at fyriliggjandi útstykkingarætlan rindar um helvtina av vegaføringini í uppskoti 1. Heitt verður á umsitingina um at fáa til vega útstykkingarætlan eystanfyri vegin, og at javna írestandi útleggi á hana. Harumframt mælti nevndin at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Ásannandi at prísurin pr.m² verður rættiliga høgur eftir verandi útstykkingarætlan, hevur umsitingin gjørt broytingaruppskot til ætlanina, soleiðis at grundstykkir verða báðumegin vegin. Eitt vanligt grundstykki á uml. 450 m² og 14 grundstykki á min. 260 m² verður soleiðis lagt afturat verandi uppskot. Hetta krevur tó at byggisamtyktin verður broytt og at kommunan ognar sær uml. 2650 m² av festijørð fra Føroya Jarðagrunni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broyttu útstykkingar ætlan sambært kortskjal nr. 2, og at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjal 1 og at byggi- og býarskipanarnevndin mælir fíggjarnevndini til at søkja Jarðargrunnin um keyp av 1400 m² av matr. nr 108 a, 1250 m² av matr.nr.107a og Vatnfelagið um keyp av matr.164 sum er 12 m².

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at taka upp samráðingar um keyp av økjunum.

**Nólsoyarnevndin 4. september 2007:** Skrivarin kunnaði um verkætlanina og tíðarætlan.

**Nólsoyarnevndin 27. november 2007:** Michael Jacobæus kunnaði um verkætlania.

Trupulleikar eru við helling av vegnum, sum samstundis merkir eitt grundstykki minni. Hetta kemur eisini, at ávirka tíðarætlanina. Arbeitt verður víðari við verkætlanini.

Frá tí at verkætlanin verður sett í verk, gongur umleið 1 ár til stykkini eru klár.

**Ískoyti:**
Í sambandi við útstykkingina hevur nólsoyarnevndin gjørt vart við at peningarstovnarnir ikki fara at fíggja sethúsabygging í oynni við tann metta m² prís. Umsitingin hevur minkað um útreiðslurnar til útstykkingina við at:

1. at taka verandi gongubreyt burtur projektinum
2. at býta útreiðslurnar til útstykkingina út á komandi útstykking eystanfyri og økini sum sambært byggisamtyktini er lagt út til stovnar og svimjuhøll.
3. at fíggja íbinding til verandi vegkervi yvir eina aðrari konto.

Soleiðis verður útreiðslan pr. m² minkað niður í 352,33 kr. pr m². Haraftrat skal leggjast íbindingargjald, grundprís og mvg, og verður fermetraprísurin tá mettur til tilsamans umleið 560 kr./m².

Víst verður til skjøl nr. 2006-1856/25 og 26.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna uppskotið hjá umsitingini og at góðkenna tekniska prosjektið, og at arbeiði síðani verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Byggi- og býarskipanarnevndin og tekniska nevnd 26. mai 2008:** Nevndirnar samtyktu at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 27. mai 2008:** Kunnað varð um málið.

**Nólsoyarnevndin 4. september 2008:** Michael Jacobæus kunnaði um málið.

**Nýtt:**
Mælt verður til at býta útreiðslurnar til umlegging av verandi vegur millum útstykkingina og konto 11. (sí hjálagt skjal nr. 2006-1856/32 ”Kostnaðarmeting” og skjal nr. 2006-1856/33 Umlegging av verandi vegur/útreiðslur pr.m².

**Fíggjarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nólsoyarnevndin 2. desember 2008:** Michael Jacobæus kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur latið gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina, og 5 bjóðandi luttóku í útbjóðingini. 4 boð eru komin inn.

| | |
|---|---|
| Articon | 4.185.149 kr. |
| J&K Petersen | 5.391.947 kr. |
| Samtakið Hansen og Jacobsen | 6.182.898 kr. |
| Sp/f Andrias Berg | 4.663.805 kr. |

Lægsta boð er hjá Articon. Av tí at prísurin fyri grót ikki er innroknaður í tilboðsupphæddina, skal leggjast 33.000 kr. fyri keyp av gróti. Samlaða tilboðsupphæddin verður soleiðis 4.218.149 kr. Hjálagt er útrokning av samlaða fíggjartørvinum, sum er 5.508.806,59 kr. íroknað mvg, projekteringsútreiðslur, v.m. (Skjal nr. 2006-1856-38). Samanborið við kostnaðarmetingina (skjal nr. 2006-1856/32 ”Kostnaðarmeting”) er tað ein meirútreiðsla upp á 32.452 kr. svarandi til 2 kr. pr. m² í samlaðu útstykkingini (sí skjal nr. 2006-1856/37).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við lægsta tilboðnum og at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játta 5.508.810 kr.til ger av útstykkingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. desember 2008:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina, kommunustjóran og miðfyrisitingarstjóran, um at staðfesta aktuella tørvin á grundstykkjum í Nólsoy, áðrenn støða verður tikin til tilboðini.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at lýsa í bløðunum at kommunan ætlar at gera útstykking í Nólsoy, og at møguligir keyparar biðjast boða Tórshavnar kommunu frá áhuga at keypa grundstykki.

**Nólsoyarnevndin 17. februar 2009:** Kunnað varð um útstykkingina, serliga tillutanina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at annulera byggibúningina, men at eini umsøkjarin, sum gjørdi vart við seg, fær møguleika at keypa grundstykki, og kemur at luttaka í heildarætlanini.

**Nólsoyarnevndin 2. mars 2010**: Nevndin umrøddi møguleikan fyri bústaðarskyldu í Nólsoy.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndarlimur biður um málið á skrá**.**

Annfinn Brekkstein ynskir umrøðu og møguliga støðutakan til sølu av grundstykkjum í Nólsoy. Uppskotið er at selja grundstykkini í Nólsoy fyri kr. 100.000 og at kommunan játtar fígging av restupphæddini, sum vantar í kostprísi. Grundgevingin er, at mett verður ikki, at tað ber til at sleppa av við stykkini fyri núverandi prís.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Umrøtt.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Nólsoyarnevndin 08. september 2015:** Umsitingin setir seg í samband við Bústaðir.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit yvir møguleikan at lækka prísin á útstykkinginum í Nólsoy. Birita Wardum, býararkitektur, kemur inn at greiða frá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mælir til at arbeiða víðari við málinum og beina málið í býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at arbeiða víðari við alternativi 4 í uppskoti til útstykkingarætlan, j.nr. 14/01828-56.

Tekniski stjórin ella býararkitekturin kemur at kunna um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur latið gera annað øðrvísi útstykkingaruppskot í Nólsoy (Alternativ 4).
Sambært bíðilistanum hjá Tórshavnar kommunu, er eingin skrivaður upp til grundstykki í Nólsoy.
Ein áhugabólkur úr Nólsoy hevur havt samband við kommununa um at skipa fyri íbúðarbygging í Nólsoy í staðin fyri útstykking til sethús, tí trupult er at fáa fígging til at byggja sethús í Nólsoy.
Umsitingin hevur tosað við Bústaðir um møguleikan fyri, at Bústaðir kunnu fara undir at byggja leigubústaðir í Nólsoy. Bústaðir eru áhugaðir, og verður í næstum farið undir at, kannað møguleikarnar fyri samstarvi um eina íbúðarverkætlan.

Tekniski stjórin og býararkitekturin kunna nevndina um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin biðja um at fáa málið á skrá komandi býráðsfund týsdagin 20. Juni 2017.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ynskið um at gera 5 grundstykki eystan fyri barnagarðin úti í Nólsoy byggibúgvin, hevur umsitingin hugt eftir uppskoti 3, sí skjalið *5 grundstykkir.pdf*, sum varð gjørt í sambandi við uppruna útstykkingarætlanina til sethúsabygging. Grundstykkini, sum eru partur av matr. 159e, liggja í sethúsaøki (A) í almennu byggisamtyktini og eru 500 $m^2$ til støddar.

Fyri at verkætlanin kann bjóðast út, verður biðið um heimild til at gera prosjekt liðugt til útbjóðing.

**Skjøl:**
*- 5 grundstykkir.pdf, j.nr. 14/01828-56*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararitekturin mæla til at játta kr. 50.000 av konto 6475 til at gera prosjekt liðugt til útbjóðing og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 20. juni 2017:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Táverandi Nólsoyar kommuna lat gera ein útstykkingarveg undir Bøbrekku á matr. nr. 159e, Nólsoy.
Í sambandi við útstykkingina í Nólsoy, hevur umsitingin kannað verandi støðu á staðnum. Staðfest er, at talan er um eina grovplanering av einum umleið 5 m breiðum vegi, undir Bøbrekku, sum gongur frá Válavegi niðan við vesturmarkinum av matr. nr. 159e og eystur yvir ímóti vesturmarkinum av matr. nr. 16 og oman í Eyggjargøtu, Nólsoy.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eitt uppskot til eina útstykkingarætlan á 5 grundøkir á umleið 500 $m^2$ hvørt, har atkomuvegurin verður 5 m breiður við bakkantsteini og 1 m strípaðari gongubreyt.
Ætlanin er at dagføra part av vegnum undir Bøbrekku við tekniskum installatiónum sum fyrireiking til, at tvey grundøkir at verða vestanfyri, og trý eystanfyri undir Bøbrekku, sum gongur niðan við vesturmarkinum av matr. nr. 159e, Nólsoy.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eitt høvuðsprosjekt og útbóðingartilfar klárt til útbjóðingar og eina samlaða kostnaðarmeting B.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02280/1 | Tekningar |
| TK j. nr. 17/02282/1 | Útbjóðingartilfar |
| TK j. nr. 17/02286/1 | Byggimálsfrágreiðing |
| TK j. nr. 17/02287/1 | Arbeiðsfrágreiðing |
| TK j. nr. 17/02858/1 | Kostnaðarmeting HVÚ |
| TK j. nr. 17/02858/2 | Samlað kostnaðarmeting B |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við teknisku verkætlanini, og at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð millum tveir lokalar arbeiðstakarar. Málið verður at leggja fyri aftur til endaliga støðutakan, tá tilboðini fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 18. september 2017:** Nevndin ynskir at fáa bústaðarskyldu knýtt at teimum 5 stykkunum í nýggju útstykkingini.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin hevur skipað fyri útbjóðing sum innbodna lisitatión millum tveir arbeiðstakarar, H. V. Lützen P/f og Maskingrevstur v/Frank Hellisdal Sp/f.
Lisitatión var hildin á digitala prosjektportalinum iBinder 19. september kl. 14.00.
H. V. Lützen hevði lægra tilboðið.

**Tilboðini vóru hesi:**

| | |
|---|---|
| Hans Vilhelm Lützen P/f | kr. 1.858.815,- íroknað fordeilingslista B(T) |
| | **kr. 1.489.935,- uttan fordeilingslista B(T)** |
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal Sp/f | kr. 2.087.200,- íroknað fordeilingslista B(T) |
| | **kr. 1.715.050,- uttan fordeilingslista B(T)** |

**Kostnaðarætlan:**
Tekniska fyrisitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarætlan áljóðandi kr. 1.100.278,- grundað á tilboð frá Maskingrevstur við uppskoti um sparingar.

**Viðkomandi skjøl í málinum:**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02283/1 | Tilboð frá H. V. Lützen |
| TK j. nr. 17/02283/2 | Tilboð frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal |
| TK j. nr. 17/02283/3 | Lisitatiónsprotokoll |
| TK j. nr. 17/02858/6 | Uppskot til sparingar grundað á tilboð frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal |
| TK j. nr. 17/02858/7 | Kostnaðarætlan A grundað á tilboð frá Maskingrevstur við uppskoti um sparingar |
| TK j. nr. 17/02858/10 | Innanhýsis notat_Kostnaðaryvirlit fyri hvørt grundøki sær |
| TK j. nr. 17/02280/1 | Matrikulplanur |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægra tilboðnum frá Maskingrevstur við tillagingum og sparingum áljóðandi kr. 910.477,- uttan fordeilingslista B(T) og fíggja áljóðandi kr. 1.100.278,- til verkætlanina av íløgukontoini fyri útstykkingar, deild 6475, góðkenna matrikulplanin, viðmæla sundurbýtið av útstykkingini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

# 216/17 Verkætlan til framhald av útstykkingini Klingrutjørn - Klingurstjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 5/17 | 17/00971-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 186/17 | 17/00971-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 219/17 | 17/00971-3 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 216/17 | 17/00971-3 |

**Málslýsing:**
Kunnað verður um status í málinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eftirspurningurin eftir grundstykkjum hevur víst seg at vera størri enn tey 48 grundøkini, sum verandi útstykking, sum nýliga er liðug Undir Kongavarða, kann nøkta.

Ráðgevi kommununar LBF P/f hevur tí, eftir áheitan, útvega útstykkingarprosjekt til 45 grundøki afturat, sum er framhald av nevndu útstykking omanfyri verandi bygging Undir Kongavarða.

Við støði í eindarkostnaðum í tilboðnum frá Articon P/f uppá undanfarnu útstykking, hevur LBF p/f kostnaðarmett framhald av útstykkingini við nevndu 45 grundøkjum til kr. 18.267.105,-.

Í eftirfylgjandi samskifti, sum umsitingin hevur havt við Articon P/f, er ynski sett fram um at einstakir eindarkostnaðir verða príssettir nakað hægri, m.a. spreinging av hellu, sum nú er nærri húsum og tí má gerast við veikari løðingum og at eindarkostnaðir annars verða prístalsreguleraðir við 4,35%.

Um Articon verður gingið á møti í ynskjum teirra um meirkostnaðir, verður mett at umleið 2,3 mió. koma afturat kostnaðarmetingini hjá LBF.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í kostnaðarmetingini frá LBF P/f, har nevndi meirkostnaðir sum Articon ynskir á 2,3 mió. er íroknaður, spreingi- og arbeiðstøkutrygging, prosjektering, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í omanfyrinevnda metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 25.377.267,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 17/00971-10), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2017.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararktekturin mæla til, at lata tað standa Articon P/f í boði at halda fram við útstykkingararbeiðinum og heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F

Articon um útstykkingararbeiðið, við nevndu kostnaðarmeting hjá umsitingini sum grundarlag, innanfyri samlaðan fíggjarkarm á kr. 25.377.267,- og at játtaðar verða nevndu kr. 25.377.267,- til arbeiðið.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini kr. 12,7 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2017 og 2018 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2018 og 2019.
Eisini verur mælt til at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, vísir á, at arbeiðið at halda fram við útstykkingini er ikki boðið út.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

# 217/17 Umsókn til yvirtøku av vegi, matr. nr. 1109n, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 45/17 | 17/00972-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 199/17 | 17/00972-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 217/17 | 17/00972-2 |

**Málslýsing:**
Eigararnir av matr. nr. 1109n, Jóhan Norðfoss og Dánjal Norfoss hava í umsókn heitt á kommununa um at yvirtaka vegin, Gráasteinsgøta. Sum framgongur á viðhefta korti, eigur kommunan longu nú stóran part av hesum vegi, litað blátt á myndini. Umsøkjarin ynskir sostatt at kommunan yvirtekur restina av vegnum. Talan er um 1282$m^2$.

Vegurin er í góðum standi og krevur ongar bráðfeingis ábøtur. Tó eru manglar, hetta mest slit av kantsteinum, vøkstur og manglandi asfalt á gongubreytum og smávegis ábøtur á sjálvum vegnum. Mett verður, at hesar smáu ábøtur kunnu bíða og raðfestast í eini framtíðar rakstrarætlan hjá kommununi. Um so er, at hesar ábøtur verða gjørdar í sambandi við yvirtøkuna, er mett at kostnaðurin er umleið kr. 84.800,- fyri privata partin og kr. 22.000,- fyri kommunala partin. Samanlagt kr. 106.800,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegin á matriklinum, uttan kostnað fyri kommununa eins og boðað verður frá, at ongar ábøtur verða framdar í sambandi við yvirtøkuna beinanvegin, men at hesar verða raðfestar saman við øðrum viðlíkahaldsarbeiði á vegum kommununnar.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 218/17 Dagføring og umlegging av kloakk Landaveg Íslandsveg 2. byggistig

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 41/17 | 17/02296-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 200/17 | 17/02296-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 218/17 | 17/02296-2 |

**Málslýsing:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá Tórshavnar Kommunu, er ætlanin at dagføra kloakkleiðingina sum er ein felagsleiðing, frá Perskonugøtu fram við Landavegnum oman í betongkistuna við Frælsið. Kloakkin er úr betong og óvist er nær hon er løgd.

Hesin partur av arbeiðinum umfatar 2. byggistig, at dagføra og umleggja verandi betongleiðing í Landavegnum frá Jøkulstræti og út um Íslandsvegin. Nýggja leiðingin verður gjørd soleiðis, at møguleiki er at regnvatn og kloakk verður sundurskilt.

Martin E. Leo, ráðgevandi verkfr. hevur gjørt útboðstilfar, j.nr. 17/02296-1 og vegna TK bjóðað arbeiðið út í innbodnari lisitatión.
Lisitatiónin var hildin á skrivstovuni hjá MEL, 24. aug. 2017. Inn komu 4 boð. Sp/f Andrias Berg hevði lægsta boð á 3.331.010,- mió.kr.
Umsitingin, saman við ráðgeva, hevur latið gjørt lisitatiónsprotokoll j.nr. 17/02296-4 og innstilling j.nr. 17/02296-6.

**Fíggjarviurskifti:**
Samlaða játtanin av makaðum íløgum fyri kloakkir 2017, konta 6875 er 5 mió. kr.
Sambært fíggjarligu uppgerð, j.nr. 17/02296-7 verður samlaði fíggjartørvurin av íløgum 2,8 mió.kr. fyri arbeiðið.
Mælt verður til at játtað 2,8 mió. kr. og taka av tilboði frá Sp/f Andrias Berg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 2,8 mió.kr. av makaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2017 konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 219/17 Kommunuskúlagarðurin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 185/17 | 17/02741-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 220/17 | 17/02741-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 219/17 | 17/02741-1 |

**Málslýsing:**
Sambært verkætlan nr. 15/02637 Kommunuskúlin: Retrofitting til býarhús, umfatar verkætlanin ikki garðprosjektið, sum skuldi koma seinni. Hetta framgongur av samtykt í fíggjarnevndini 19.04.2016, mál nr. 15/01465.

Í avtaluni millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir framgongur, at:
*Útyvir verkætlanina, verður í løtuni serskilt arbeitt við at gera drening av kjallaraveggjum og sokkli um bygningin og íbinding til kloakk, umframt nýggja parkeringsloysn oman við Tróndargøtu. Umsitingin vendur aftur, tá hesin kostnaður er kendur. Arbeiðið hevur alla tíð verið uttanfyri verandi verkætlan. Hetta arbeiðið skal samskipast við gerð av garðprosjekt seinni.*

Drening og kloakk er avgreitt.

Nú er so farið undir at arbeiða upp á garðin, og hevur býarskipanardeildin saman við tekniska stjóranum, í samráði við Bústaðir og arbeiðstakara á staðnum, mett tað verða røttu loysnina at reinsa eldri yvirskotstilfar í hægra partinum av garðinum niður á hellu, so hendan gerst fyri ein part sjónlig við endaligu loysnini. Garðurin kemur bæði í mun til nýggju nýtsluna av skúlanum og býnum sum heild at hava stóran týdning sum miðdepil og uppihald fyri borgarar í øllum aldursbólkum, og tískil varð mett, at garðurin somuleiðis skuldi bjóða býnum eina øðrvísi uppliving.

Við at grava verandi ífyllu burtur og gera hellulandslagið sjónligt, verður hetta ein garður sum brýtur frá tí annars siðbundna býnum við asfalti ella aðrari álegging; hetta verður ein garður, sum bjóðar náttúruni vælkomna inn í miðbýin.

Hendan tilgongdin til garðin hevur so havt við sær, at rættiliga stórur hæddarmunur er á garðinum og eitt nú inngongdunum í bygninginum, og tískil er neyðugt at tryggja atgongd til høvuðsdyrnar í norðaru- og eystaru lonini, umframt at atgongd mátti skipast til nýggjan tunnil frá garðinum og út á Tórsgøtu/Niels Finsens gøtu. Atkoman verður gjørd við betong gøtum í og omaná lendinum. Har hæddarmunurin millum gøtuna og hellulandslagið verður ov høgt, er ætlanin at seta rimaverk upp. Ætlanin er at gera rimaverk í eldri stíli, smíða í essu, sum vit kenna tað aðrastaðni í býnum, t.d. við kirkjugarðinum á Svínaryggi, á Trappuni í Vágsbotni og framvið Havnará niðan móti SSB.

Ætlanin er somuleiðis at fyrireikað nøkur grøn øki og onnur flísaløgd uppihaldsøki í garðinum við beinkjum og øðrum innbúgvi, umframt at tryggja parkeringsøki til bilar, øki til rørslutarnað og øki til neyðsendarakfør. Sum heild at innrætta garðin til nýggja tørvin á staðnum, men eisini sum eitt uppihaldsøki fyri almenningin og eitt øki at ferðast ígjøgnum.

Fyri at kostnaðarstøði av verkætlanini ikki gerst ov høgt, so verður alt planlagt stig fyri stig á staðnum saman við arbeiðstakara og ráðgeva.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitektur mæla til at at taka undir við ætlanini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 1.550.000,00 av kt. 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið i býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 220/17 Útstykking Kaldbak - Fyrispurningur um íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 173/17 | 17/02439-1 |
| 2 Kaldbaksnevndin | 05.10.2017 | 7/17 | 17/02439-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 220/17 | 17/02439-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Samandráttur av málslýsingini, mál nr. 14/01389 Útstykking Kaldbak. Sølustøða.:

**Býráðið 2. mai 2012:**
Málið um útstykkingina av 10 sethúsagrundstykkjunum í Kaldbak (við Krossá), 6 omanfyri og 4 niðanfyri vegin, hevur verið drúgt, har ivamál hevur verið um hvørt stykkini hava skula verið gjørd byggibúgvin av kommununi, sum vildi gjørt stykkini enn dýrari, ella at lýsa stykkini til sølu til marknaðarprís. Í 2012 varð marknaðarprísurin mettur at vera hægri enn kostprísurin. Leiðarin í starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæltu til í 2012 at lýsa tey óseldu stykkini í fríðari sølu til marknaðarprís. Fíggjarnevndin tók undir tilmælinum vegna at eingin áhugi var til staðar at ogna sær grundøki har (mál nr. 14/01389 – Útstykking Kaldbak. Sølustøða.).

**Býráðið 28. juni 2012:**
Síðani fekk INNI uppgávuna at selja grundøkini í Kaldbak, tó við fyrivarni um, at býráðið góðkendi søluna av hvørjum einstøkum grundøki. Eigararnir av tveimum óbygdum grundøkjum gjørdu vart við, at fría sølan fekk tað fylgju, at teirra grundøki minkaði í virði. Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæltu til at kommunan kundi keypa stykkini aftur fyri kostprís, vísandi til at talan var um eina trupla og dýra útstykking. Hetta varð samtykt av býráðnum 28. juni 2012.

**Fíggjarnevndin 12. september:**
Nakrir eigarar av ábygdum sethúsa grundøkjum í útstykkingini vendi sær til kommununa í brævi 10. juli 2012 (2012-1733/1) um býráðssamtyktina 2. mai 2012, um at selja óseldu stykkini til hægstbjóðandi. Teir ynsktu at fáa afturgoldið munin sum stykkini vóru seld fyri tá, og tann prís sum teir keyptu stykkini fyri. Teir mettu at talan var um umleið kr. 200.000,00 hvør, umleið kr. 800.000,00 í alt. Umsitingin metti at kommunan ikki hevur heimild til at endurrinda eigarunum av ábygdu grundøkjunum munin millum keypsprís og møguligan søluprís av grundøkjunum tá, og mæltu leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til ikki at ganga umbønini á møti. Hetta samtykti fíggjarnevndin 12. september 2012.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:**
Fram til februar 2016 var bert eitt grundstykki omanfyri vegin selt, meðan trý niðanfyri vóru seld. Talan var sostatt um 4 seld grundstykki í býlinginum. Sethús vóru bygd á tey fýra grundstykkini.
Teir 4 upprunaeigararnir hava í skrivi 12.02.2014 (Skjal 14/01389-15) vent sær til kommununa, har teir vístu ónøgd við, at kommunan nú seldi grundstykkini fyri kr. 200.000,00 og ynsktu teir at verða javnt stillaðir við komandi keyparar.
Grundstykkini hava um hetta mundið ligið á sølulista hjá INNI síðani juli 2012 við einum prísuppskoti á kr. 200.000,00, men enn vóru ongi grundstykki seld.
INNI fekk síðani eitt boð á kr. 200.00,00 (mál nr. 15/04699).

Kostprísur fyri grundstykkið er 411.832,- og var innkomið boð kr. 211.832,- lægri enn kostprísur. Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæltu til ikki at selja grundstykki fyri innkomið boð á kr. 200.000. Mælt var samstundis til at taka grundstykkini av listanum hjá meklara, og at stykkini komu at standa á sølulista hjá kommununi til kostprís.

**Kaldbaksnevndin 29. mars 2017:**
Í 2017 vórðu umrøddir ymiskir møguleikar við Kaldbaksnevndina. Ein var at sláa grundstykkini saman og selja tað til t.d. Bústaðir. Ella selja stykkini til marknaðarprís og fáa eina kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:**
Status var um hetta mundið, at 4 grundstykki út av 10 vóru seld, og høvdu tey staðið á sølulista síðani 2009. Avbjóðingar var jú sum nevnt at planera stykkini.
Skyn metti virðið av grundstykkjunum til kr. 500 fermeturin, svarandi til ein mettan søluprís í alt á kr. 1.550.00,00. Betri heim metti søluvirðið fyri matr. nr. 22s til kr. 250.00,00 og hini matr. nr. 22v, 22x, 22y, 22z til kr. 150.000,00 pr. stk.
Stykkini kundi verið seld fyri ein miðal metingarprís (Skyn kr. 500 + miðal INNI kr. 323), sum svaraði til ein miðal fermetraprís á kr. 411,50 og samlaði søluprísurin fyri útstykkingina í síni heild tá 1.276.061,50. Bóka útlegg var 2.125.393,00. – mettan søluprís kr. 1.276.061,50 og restútlegg 849.331,50. Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæltu til at lýsa grundstykkini til sølu fyri í minsta lagi prísuppskot sambært meting, og at fíggja restútlegg kr. 849.331,50 yvir konto 6175 Umsiting og røkt fastari ogn (íløgur).
Kaldbaksnevndin tók 20. juni 2017 undir við at selja grundstykkini undir vegnum matr. 22s til marknaðarprís kr. 213.568,50 og at Tórshavnar kommuna fór í samráðingar við Bústaðir um at byggja íbúðir omanfyri vegin. Um tær samráðingar ikki bera á mál verður farið undir at selja grundøkini omanfyri vegin fyri marknaðarprís.
Fíggjarnevndin samtykti sama dag at selja grundstykkini undir vegnum matr. nr. 22s til marknaðarprís kr. 213.568,50 og at fara í samráðingar við Bústaðir.

---

Ta seinastu viðgerð, sum málið hevur fingið, var 20. juni 2017, har býráðið samtykti meirilutatilmælinum í fíggjarnevndini.
Tilmælið frá fíggjarnevndini var soljóðandi:

> *Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turid Horn samtykkja at selja grundstykkini undir vegnum matr. 22s til marknaðarprís kr. 213.568,50 og at fara í samráðingar við Bústaðir um at byggja íbúðir á stykkinum omanfyri vegin. Um hesar samráðingar ikki bera á mál verður farið undir at selja grundøkini omanfyri vegin fyri marknaðarprís og beina málið í býráðið. Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at núverandi eigarar í útstykkingini ikki verða viðgjørdir undir somu treytum.*

Fyri at kunna byggja íbúðir omanfyri vegin, skal byggisamtyktin broytast. Núverandi byggisamtykt fyri Kaldbak er deild upp í eindir og er eind A, sum umrøddu økini eru í, bert til sethúsabygging.

Serstaka byggisamtyktin fyri Kaldbak ásetur, at áðrenn bygt verður á eina ogn, skal verða fyri býráðnum lagdar tekningar fram, ið sýna grundina, umhvørvið, staðseting, hvussu húsini standa á grundini, stødd, snið og innrætting, eins og upplýsingar skulu verða givnar um, hvat húsini og grundin eru ætlað til. Býráðið kann soleiðis ansa eftir, at gjørt verður eftir byggisamtyktini.

Áhugi er nú at byggja íbúðir, sum tættar um býlingar og fær fleiri íbúgvar fyri hvønn $m^2$, tí er neyðugt at orða eitt ískoyti í byggisamtyktina fyri Kaldbak.

Uppskotið at orða eitt ískoyti í byggisamtyktina, fevnir um matriklarnar omanfyri vegin við Krossá (sí Loftmynd 17/02439-5).

Núverandi ásetingarnar fyri eind A (sethús) eru:

a. *Eindirnar A. Sethúsabygging.*
   1. *Økið skal einans verða nýtt til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg og við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi.2*
   2. *Á økinum kann ikki verða fram nakað slag av virki, sum við royki, gangi ella við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann verða teimum, sum uttanum búgva til ampa.*

*Uppskot til broyting í stk. 3:*
*Á matriklarnar omanfyri vegin við Krosslá, har stórur hæddarmunur er á lendinum, er loyvt at byggja íbúðir, og kann tað út frá einari heildarætlan í samband við íbúðarbygging víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Gr. 2. NÝTSLA ØKISINS*

a. *Eindirnar A. Sethúsabygging.*
   1. *Økið skal einans verða nýtt til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg og við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi.*
   2. *Á økinum kann ikki verða fram nakað slag av virki, sum við royki, gangi ella við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann verða teimum, sum uttanum búgva til ampa.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Hetta málið og henda málslýsing er framhald av máli nr. 14/01389 – Útstykking Kaldbak. Sølustøða. Sí samandrátt omanfyri.

**Skjøl**
Serstøk byggisamtykt fyri Kaldbak – kort (17/02439-4)
Serstøk byggisamtykt fyri Kaldbak – tekstur (17/02439-4)
Loftmynd (17/02439-5)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna ískoytið í byggisamtyktina fyri Kaldbak, soleiðis at bygging omanfyri vegin við Krosslá kann loyvast og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:

Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

Atkvøddi blankt:
Annfinn Brekkstein.

# 221/17 Broyting av almennu byggisamtyktini - nýggjar ásetingar fyri A1 um íbúðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 171/17 | 17/02480-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 221/17 | 17/02480-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin og byggi- og umhvørvisdeildin hava lagt mál fram um at endurskoða og nútíðargera almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Í sambandi við at nútíðar byggimynstrið í Tórshavnar kommunu, í størri mun enn áður, er merkt av íbúðarbygging, so er tørvur á at endurskoða og nútíðargera almennu byggisamtyktina.
Í verandi líki er torført at góðkenna bygging av íbúðum í t.d. 3 hæddum, har umsitingin metir tað vera møguligt og ráðiligt, tí ásetingar fyri stak- og raðhús loyva ikki slíka bygging.

Nakrar verkætlanir um íbúðarbygging eru antin farnar fyri skeyti ella er mannagongdin týðiliga seinkað vegna broytingar í serstøkum byggisamtyktum fyri økini og almennu byggisamtyktini. Núverandi almenna byggisamtyktin er tískil, í ávísum førum, ein forðing fyri íbúðarbygging. Her kunnu nevnast verkætlanir sum oman Mattalág, Óðinshædd II og Heimasta Horn hjá Bústaðir. Í Óðinshædd er t.d. ikki møguligt at byggja íbúðir við 3 hæddum eftir almennu byggisamtyktini, ei heldur serstøku byggisamtyktini nr. 7, sum er galdandi fyri ein stóran part av eysturbýnum.

Væntast kann, at fleiri øki í Tórshavnar kommunu verða nýtt til bygging av íbúðum í framtíðini, tí mælir umsitingin staðiliga til at broyta byggisamtyktina.
Bygging av íbúðum er harafturímóti eitt ynski hjá kommununi, soleiðis at bústaðartørvur, –býti og –politikkur kann nøktast og fylgjast samstundis sum til ber at tætta um býin. Harafturat er hetta í tráð við samgonguskjalið, sum leggur upp til at umsitingin gjøgnumgongur og dagførir almennu- og serstøku byggisamtyktirnar.

Ásetingarnar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru:
*A1: §5 - Stk.9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.*
*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir*
*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

Uppskot til broyting í niðasta reglubrotið ljóðar soleiðis:
*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn* ***ella har kommunan eftir heildarmeting heldur tað vera ráðiligt.***

Við hesum ískoyti í ásetingunum fyri A1 í almennu byggisamtyktini, um bygging av íbúðum, fær umsitingin skipað hvørji øki verða sett av til íbúðabygging.
Í núverandi løtu eru fleiri verkætlanir, sum Bústaðir og aðrir byggiharrar arbeiða við og kann væntast at fleiri umsóknir um byggiloyvi verða kommununi í hendi í nærmastu framtíð, sum eru útstykkingarætlanir um íbúðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*A1: §5 - Stk.9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.*
*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir*
*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

*A2: §6 – Stk. 5. Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

*A3: Stk. 1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tilíkt.*
*Stk. 9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Býarskipanardeildin og byggi- og umhvørvisdeildin hava gjørt vart við, at byggisamtyktirnar í fleiri førum forða fyri at loyvi kunnu gevast, har kommunan metir tað verða ráðiligt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 17/02748 – Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi býararkitekturin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla nevndini til at góðkenna ískoytið, har umsitingin kann loyva bygging av íbúðum í sambandi við eina heildarætlan, sum kommunan hevur góðkent og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

# 222/17 Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 170/17 | 17/02748-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 222/17 | 17/02748-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu var á fyrsta sinni gjørd í 1972 sambært løgtingslóg nr. 13 um byggisamtyktir og býarskipan frá 21. mai 1954.

Byggisamtyktin var endurskoðað í 1996 og seinast í 2009 í sambandi við, at býráðið og umsitingin ynsktu at endurskoða almennu byggisamtyktina og tær serstøku byggisamtyktirnar.
Síðani eru nógvar broytingar gjørdar bæði í kortskjalinum í almennu byggisamtyktini og tekstinum tó uttan, at hon er endurskoðað sum heild.
Dagførda almenna byggisamtyktin varð endaliga góðkend í desember 2012.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 2. mai 2005 og býráðið 26. mai 2006 (mál nr. 2005-1123) at seta ein bólk til at endurskoða og nútíðargera byggisamtyktina.
Endamálið var at fáa eitt betur stýrisamboð til dagligan rakstur og framtíðar útbyggingar av kommununi. Samstundis varð tað gingið ígjøgnum verandi byggisamtykt, bæði viðvíkjandi ásetingum og reglum eins og kortskjal.
Býráðið tók undir við hesum tilmæli:
*Tilmæli:*
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd, heilsu- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina góðkennur ætlaðu skipanina av arbeiðinum og velur eina serstaka nevnd við heimild í §36 í Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, samansett av 2 umboðum fyri byggi- og býarskipanarnevndina, 1 umboð fyri teknisku nevnd, 1 umboð fyri heilsu- og umhvørvisnevndina, tekniska stjóranum, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum, til at standa fyri arbeiðinum at endurskoða og nútímansgera byggisamtyktina. Samstundis verður mælt til, at fylgibólkurin ið settur er sambært býráðssamtykt 26. mai 2005, j. nr. 2005-1123, verður avtikin.*

Tey seinastu árini eru heilt nógvar umsóknir um broyting í byggisamtyktum komnar umsitingini í hendi. Søkt verður um broytingar, ið ikki skuldu verið neyðugar í mun til bygging og samtíðina. Tí er ynski um at endurskoða ta almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtyktirnar av nýggjum. Ítøkiliga skulu byggisamtyktirnar dagførast, gerast tíðarhóskandi, verða meiri skipaðar og kunna umsitast skynsamt.

Bygningskunngerðin ásetir, at har sum ein góðkend byggisamtykt er, gongur hon framum ásetingarnar í BK17 kap. 2 um bygningsreguleringar og ásetingar.
Serstakar byggisamtyktir liggja omaná bæði bygningskunngerð og almennu byggisamtyktina.
Broytingar í byggisamtyktum eru ikki fyrisitingarligar avgerðir, men skal metast sum eitt reguleringsamboð ella “lóggávubroyting”. Tí skal viðmælast til at tær skulu fylgjast.

**Mannagongd:**
Í fyrstu atløgu verður málið lagt fram til býráðið at umrøða.

Skotið verður upp at skipa ein arbeiðsbólk og stýrisbólk, har tíð verður sett av til at arbeiða miðvíst við byggisamtyktunum. Atlit skulu takast til bygningskunngerðina og aðrar kunngerðir og ætlanir, soleiðis at gjøgnumskygni og samsvar er millum almennu byggisamtyktina, serstøku byggisamtyktirnar, kunngerðir og ætlanir, ið annars umrøða bygging og byggisamtyktir.

Allar deildir og starvsfólk, ið beinleiðis hava við byggisamtyktir at gera, skulu vera tikin til orðanna. Byggisamtyktirnar eru eitt sera týdningarmikið amboð og grundarlag fyri framtíðar útbygging av kommununi. Tí er neyðugt at øll, ið dagliga arbeiða við byggisamtyktum, gerast ein partur av arbeiðinum at endurskoða byggisamtyktirnar.

Týdningarmikið er, at tíð verður sett av til endurskoðanina. Arbeiðið kann skipast við einum arbeiðs- og stýrisbólki, har avgerast skal, hvør situr í ávikavist arbeiðs- og stýrisbólkinum. Í stýrisbólkinum kunnu býráðslimir og umboð fyri teknisku umsiting sita við heimild í §36 í Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri. Fylgibólkar kunnu samstundis setast í verk við ávísum uppgávum, um neyðugt.

Uppskot til arbeiðsbólk:
Sigurd Justinussen, málsviðgeri
Rakul Vest Højgaard, málsviðgeri
Hans Suni Eiriksfoss, byggimálsviðgeri

Uppskot til stýrisbólk:
Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini
Tekniski stjórin
Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini
Býararkitekturin

Endurskoðan og dagføring av byggisamtyktum kann fara fram 5. hvørt ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrra málið um endurskoðan av byggisamtyktunum:
2009-0216

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at umrøða málið um endurskoðan av byggisamtyktunum, at samtykkja uppskotið til mannagongd við arbeiðs- og stýrisbólki, umframt at dagføring av byggisamtyktum fer fram 5. hvørt ár og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at politisku umboðini verða Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Vísandi til § 36, stk. 1 í løgtingslóg um kommunustýri kann kommunustýrið seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd, og sambært § 36, stk. 2 í somu lóg er tað kommunustýrið, sum ásetir nærri reglur um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla býráðnum til at velja limir í stýrisbólkin, ið skal endurskoða byggisamtyktirnar.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Anniku Olsen, um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 223/17 ClimatePlanet, 13. oktober 2017 í Keypmannahavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 14.09.2017 | 42/17 | 17/03037-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 223/17 | 17/03037-1 |

**Málslýsing:**
Her verður skrivað ein stutt og greið lýsing av málinum:
Climate Planet, sum Jesper Theilgaard er høvuðs personur er eitt konsept sum hevur til endamál at verða við til at finna út av hvussu vit tilpassa okkara klima til okkara planet.

Konseptið er bygt upp við eini høll (sum er ein rund jørð), sum er innrættað soleiðis, at har kunnu sita uml. 400 fólk til film, framløgur o.a.. Ein jørð er í rúminum sum vísir beinleiðis mynd av jørðini, umframt 4 stórar skermar til at vísa filmar og annað á.

Climat Planet skal flyta frá Århuus til Islands Brygge í Keypmannahavn, har tað kemur at verða frá 23. september til 22. oktober 2017. Umboð í Føroyum hava fingið bjóða at fáa ein dag, og er tann dagurin ásettur til at verða 13. oktober, sum er dagurin har eisini "kulturnat" verður í Keypmannahavn.

Luttakarar úr Føroyum verða Tórshavnar kommuna, Landsstýrið, SEV og Atlantic Airways.

Ætlanin er, at dagurin verður skipaður sum ein heild, har m.a. ein felags filmur verður vístur sum lýsir Føroyar út frá øllum luttakarunum. Eisini er ætlanin at umboð fyri luttakararnar eru á staðnum fyri at svara spurningum, tosa við vitjandi o.a.

Dagurin verður skipaður soleiðis, at fyrraparturin verður fyri innbodnum og seinnaparturin og kvøldið verður fyri øllum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Luttøkan fyri Tórshavnar kommunu er mett at kosta upp til kr. 250.000, harav leiga fyri øki/lokali er kr. 40.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
- at Tórshavnar kommuna luttekur á Climat Planet 13. oktober 2017 í Keypmannahavn saman við øðrum.
- at játtaðar verður upp til kr. 250.000 av konto 6210 Umhvørvistiltøk o.a.
- at fyri Tórshavnar kommunu luttaka forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 14. september 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Hallu Samulesen, um at atkvøða um tilmæli til Náttúrúru- og umhvørvisnevndina, ið varð samtykti við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

# 224/17 Grótið frá Sandoyartunlinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 181/17 | 17/02930-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 18.09.2017 | 6/17 | 17/02930-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 224/17 | 17/02930-1 |

**Málslýsing:**
Tunnilin:
Sandoyartunnilin verður 10,9 km langur og 9,5 m breiður, lægsta punkt er 155 metrar undir havbotninum og mesta hallið verður 5 prosent. Sandoyartunnilin kemur upp í Traðardali millum Skopun og Sand, og streymoyarmegin kemur hann upp á Gomlurætt.

Jarðfrøðiligar undankanningar eru gjørdar, projekteringin er byrjað og eftir tíðarætlanini byrjar arbeiðið í 2018. Byggitíðin er sett til 5 ár, soleiðis at tunnilin verður liðugur í 2023.
Mett ferðsla pr. samdøgur er 310 bilar

Roknað verður við at nøgdin av gróti sum kemur úr tunnlinum verður áleið ein mió m3, harav uml helvtin, ella uml. 500.000 m3, kemur upp á land við Gomlurætt.

**Avgerast skal hvat alt grótið skal brúkast til.**

Búnaðarstovan:
Búnaðarstovan hevur spurt kommununa um tað krevur loyvi frá kommununi at taka ímóti gróti frá tunnlinum, at leggja út á lendi á Velbastað, hetta er okkara j.nr. 17/00760.

Kommunan hevur svarað, at sambært almennu byggisamtyktini kap. 4 §26, um ásetingar fyri 4. grundumráði, so eru broytingar í 4.gr. t.d...velting og moldbreiðsla...o.l., har landsløg verða broytt, umfatað av almennu byggisamtyktini og krevja tí loyvi frá kommununi.

Í eini viðgerð skal kommunan taka atlit til um aðrar ætlanir eru í umráðnum viðvíkjandi bygging, vegagerð, um økið er ætlað til byggilendi nú ella seinni, hvat náttúruvirði er í økinum og ymiskt annað. Tí eiga nágreiniligar árinskanningar/umhvørviskanningar at verða gjørdar av økinum, áðrenn nøkur støða verður tikin.

Um so er at grót skal verða lagt út, er tað eisini av stórum týdningi, at arbeiðið verður viðvíkjandi landslagi væl tilpassað verandi lendi og ikki sær út sum nakað ónatúrligt í økinum.

Tá talan er um 4. grundumráði, so skulu friðingarmyndugleikarnir eisini hava málið til viðgerðar.

Møguleikar:
Talan er um sera stórar nøgdir av gróti og tí er tað umráðandi at grótið verður brúkt til nakað skilagott og at hetta verður væl planlagt og projekt gjørt. Hildið verður, at gróti er væl egnað til fyllu og planering í sambandi við verkætlanir, har nógv grót skal brúkast.

Tá talan er um so nógv grót, so er best at finna eina loysn sum ikki krevur at grótið skal flytast alt ov langt, tá tað ikki vil verða umhvørvisliga burðadygt. Heldur ikki eigur gróti at verða flutt fleiri ferðir, tá tað ikki er fíggjarliga burðadygt.

Ein loysn kundi verið at lagt inn eitt heilt nýtt bústaðarøki á Velbastað, sum kann innihalda sethús, raðhús, íbúðarbygging, miðstaðarøki, ítróttarøki o.a.. Økið vestanfyri Kirkjubøarvegin, sum liggur millum kotu 110 og 140, er væl egnað til bústaðarøki. Hetta vendir vestureftir, hevur gott útsýni, tað er skjótt til Havnar og øki liggur tætt til tunnilsmunnan. Øki liggur í 4.grundumráði og verður tí neyðugt at broyta byggisamtyktina.

Harafturat kann partur av grótinum helst nýtast til at tryggja bakkaverjuna í Kirkjubø og á Velbastað.

Tann 31. august 2017 hevði EST fund við Tórshavnar kommunu har teir upplýstu, at teir fara at koma við eini umsókn til kommununa um grótið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at kommunan tekur upp samráðingar við tunnilsfelagið um at fáa grótið úr tunlinum.
Eisini verður mælt til at umsitingin kannar, um grótið kann brúkast til bakkaverju og til eina útstykking og at býarskipanardeildin ger uppskot til nýtt bústaðarøki, at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 18. september 2017:** Borgarstjórin heitir á nevndina um at koma við góðum hugskotum. Samstundis tekur nevndin undir við at partar av grótinum kann brúkast sum verja framman fyri kirkjuna.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Útsett.

## 225/17 "Sandoyartunnil – Vegaføringin við Gomlurætt"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 47/17 | 17/02908-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 177/17 | 17/02908-2 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 18.09.2017 | 5/17 | 17/02908-2 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 225/17 | 17/02908-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur fingið skjøl sum vísa ætlaðu vegalinjuna á Gomlurætt til tunnilsmunnan til Sandoyartunnilin.

Umsitingin er av tí fatan, at kommunan sum vega- og byggimyndugleiki eigur at vera hoyrd og vera tikin við í einum so týðandi máli, eins og gjørt er aðrastaðnis í landinum. Umsitingin hevur fingið upplýst frá Umhvørvisstovuni, at matrikuleringin av tunnilsmunnanum er gjørd, hóast kommunan ikki hevur latið ummæli. Her kann vísast á, at kommunan hevur á fundum ávikavist við Henrik Old, landsstýrismann í samferðslumálum tann 23.01.2017 og við Tunnilsfelagið tann 30.01.2017. (sí j. nr. 17/02908-3), har spurningurin um tunnilsmunnan varð umrøddur.

Tað sær út til, at loysnin sum er vald, bert er vald út frá einum fíggjarligum endamáli og ikki einum fakligum grundarlagi, uttan at kommunan hevur lati sítt ummæli. Eisini kann viðmerkjast, at fagfólk hjá kommununi og Landsverk tykjast at vera samd um, at verandi loysn ikki er tann besta loysnin, og eigur tí at vera endurskoðað.

Ynskiligt er, at kommunan sleppur at ráa yvir havnaøkinum á Gomlu rætt, ella partar av økinum eins og aðrar kommunur, har undirsjóvartunlar hava avloyst sjóvegis sambandi.

Umsitingin hevur fylgjandi viðmerkingar til staðsetingina av tunnilsmunnanum og nýtslumøguleikarnar á Gomlu rætt:

- TK ynskir at varðveita økið sum havnaøki, sum er einasta havnaøki í kommununi, sum vendur vestureftir móti Koltri og Hesti.
- TK ynskir at kunna nýta økið til vinnuligt virksemi og at menna økið í hesum sambandi, herundir til ferðavinnu, aling, smábátar, frítíðarvirksemi o.a. Av tí at talan er um ein landsveg, sum liggur upp at tunnilsmunnanum, ferð at bera illi til at gera íbindingar í vegin frá møguligum virksemi á staðnum.
- Vegurin frá tunnilsmunnanum og niðan á Kirkjubøarvegin er gjørdur við tveimum "hárnálasvingum" sum kemur at tarna ferðsluni. Vanligt er, at landsvegir eru 80 km/t vegir, tí verður ikki mett, at tað er hóskandi, at hesin vegurin verður gjørdur soleiðis, at ferðin bert kann vera uml. 30 km/t, har tað eisini er trupult at koma upp aftur í ferð, umframt at vegurin gongur ígjøgnum eitt havna- og vinnuøki.
- Gamlarætt er tilbúgvingarhavn í sambandi við Hestur og Koltur og eisini í sambandi við ymiskt á sjónum.
- Tann dagin tunnilin ikki kann nýtast, er frægasta leiðin um fjørðin frá Gomlurætt til Sandoynna, Heyst, Koltur og vestureftir, bæði til ferða- og vinnuligan flutning.

- Á Velbastað eru góðir møguleikar fyri býarvøkstri, og ein natúrligur partur av hesum er vinnuligt virksemi, herundir eisini virksemi, sum skal liggja á havnaøki upp at bryggjukanti.
- Skulu Hestur og Koltur mennast sum útoyggjar, so er Gamlarætt ein avgerandi treyt fyri menningarmøguleikum.

Tað er týdningarmikið, at hetta økið, sum er virðismett til uml. 200 mió. kr., verður gagnnýtt á besta hátt, soleiðis at hetta kann verða ein vinningur fyri kommununa og landið sum heild.

Viðmerkjast skal, at kommunan ikki hevur fingið nøkur skjøl, ið lýsa fyrimunur og vansar við tí loysn, ið fyriliggur.

Landsverk hevur gjørt eitt upprit, sum vísir á vansar og møguleikar, sum Landsverk metir vera eina betri loysn vísandi til, at Landsverk ikki metir uppskotið vera gott fyri økið. Sí skjalið "Notat um Sandoyartunnil 26.11.2015".
Fyrisitingin hjá TK er samd við tí sum framgongur av skjalinum frá LV.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðisparti K í byggisamtyktini fyri Kirkjubø.

**Ásetingar fyri øki K: Landbúnaður**

1. Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.

2. Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald.

3. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

4. Útstykking má ikki fara fram.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onnur mál har undirsjóvartunlar eru gjørdir, hesi eru ikki kannaði.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Økið liggur í umráðisparti K í byggisamtyktini fyri Kirkjubø.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 4-6

**Fíggjarlig viðurskifti**
Økið hevur stóran og avgerandi fíggjarligan týdning fyri kommununa, við atliti til teir møguleikar sum liggja fyri at gagnnýta øki sum eitt menningarøki í kommununi.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Lýsingin omanfyri er gjørd av teknisku fyrisiting

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Notat frá LV um Sandoyartunnil 26.11.2015, j. nr. 17/02908-1.
Fundarfrásøgn frá fundunum við Henrik Old, landsstýrismann í samferðslumálum tann 23.01.2017 og við Tunnilsfelagið tann 30.01.2017, j. nr. 17/02908-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til, at kommunan heitur á umsøkjaran at endurskoða verandi ætlan í samráð við kommununa og Landsverk, vísandi til, at verandi vegaføring ikki verður mett at vera ein skilagóð loysn, bæði í sambandi við vegalinju, býarplanlegging og fyri økið sum heild.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Tann 17.09.17 boðaði Umhvørvisstovan kommununi frá, at teir ikki enn hava frámatrikulerað tunnilsportalin á Gomlurætt, men at misskiljing helst er komin í orsakað av, at broytingin av kortinum slær út á kortal.fo beinan vegin hon er gjørd.

Tann 15.09.2017 móttók kommunan fylgjandi skriv frá Petur Nielsen, stjóri á Umhvørvisstovuni:
Til Christian Andreasen, adv.
Hervið verður sagt frá, at Umhvørvisstovan hevur avgjørt at gera eitt sundurbýti til tunnilsportal á Gomlurætt, sum er í samsvari við umsóknina hjá tunnilsfelagnum.

Vísandi til niðanfyristandandi hoyringssvar frá tunnilsfelagnum v/ Christian Andreasen adv. og undanfarna hoyringssvar frá Tórshavnar kommunu skal Umhvørvisstovan gera greitt, at kommunan sambært býarskipanarlógini (LL 13/1954) er planmyndugleiki. Tí eru viðmerkingarnar hjá kommununi viðv. disponering av økinum á Gomlurætt bæði legitimar og viðkomandi. Umhvørvisstovan staðfestir tó samstundis, at havnaøkið á Gomlurætt í galdandi byggisamtykt ikki er lagt út sambært viðmerkingunum hjá kommununi, men liggur sum K-landbúnaðarøki. Í hoyringssvari sínum hevur tunnilsfelagið eisini víst á, at hóast sundurbýtið verður gjørt nú, so forðar hetta ikki fyri eini eftirfylgjandi samráðingartilgongd millum felagið, Tórshavnar kommunu og avvarðandi landsmyndugleikar um evt. at flyta tunnilsportalin.

Á hesum grundarlag hevur Umhvørvisstovan tikið avgerð um at fremja sundurbýtið. Tó skal stovnurin viðmerkja, at tilgongdin í planhøpi má metast at vera óheppin. Tí verður mælt pørtunum til at brúka tíðina frá nú av og til atbeiðið byrjar, at finna eina semju um plaseringina av tunnilsportalinum á Gomlurætt og um framtíðar brúkið av havnaøkinum og at staðfesta hetta í serstakari byggisamtykt fyri økið.

b.h. Petur Nielsen, stjóri Umhvørvisstovan

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 18. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt, at býráðið ikki tekur undir við verandi linjuføring á Gomlurætt og mælir landsins myndugleikum til, at taka upp nýggjar sarmáðingar við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil. Býráðið tekur undir vð samtyktini í Byggi- og býarskipanarnevndini 13. september 2017.

# 226/17 Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 22/16 | 16/04639-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 226/17 | 16/04639-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013, § 4 skulu kommunurnar seta barnaverndarnevndir, ið verða valdar av kommunustýrinum. Í greinini er ásett, at í eini barnaverndarnevnd skulu vera í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir. Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu í minsta lagi hava eina viðkomandi miðallanga útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- og bygdarráð og hava eina revsiváttan.
Barnaverndarnevndin hevur síðan 2008 talt fimm nevndarlimir

Í 2012 vóru hesi vald**:** Ann Elisabeth Joensen, Poula Eidesgaard, Henrik Thomsen, Hjørdis Heindriksdóttir og Miriann Jacobsen. Tiltakslimir vóru: Eyðálvur Dimon, Bjarni Beder, Jóngerð Poulsen, Búi Brattaberg og Hildigunn Poulsen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:**

| Fastir limir | Varlimir |
|---|---|
| Súsanna Olsen | Róaldur Jákupsson |
| Maibritt Svabo Egholm | Búi Brattaberg |
| Jóannes Guttesen | Malan Eyðunsdóttir |
| Ann Elisabeth Joensen | Poula Eidesgaard |
| Henrik Thomsen | Eyðjálvur Dimon |

**Ískoyti:**
Sagt verður frá at Maibritt Svabo Egholm hevur boða frá, at hon tekur seg úr nevndini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja nýtt umboð í barnaverndarnevndina.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Vald varð Rúna Hansen.

# 227/17 Fíggjarætlan 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 123/17 | 17/01619-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 145/17 | 17/01619-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 29.05.2017 | 27/17 | 17/01619-1 |
| 4 Eldranevndin | 29.05.2017 | 10/17 | 17/01619-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 31.05.2017 | 138/17 | 17/01619-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 156/17 | 17/01619-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 38/17 | 17/01619-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 02.10.2017 | 40/17 | 17/01619-1 |
| 9 Eldranevndin | 02.10.2017 | 18/17 | 17/01619-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 245/17 | 17/01619-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 14.09.2017 | 37/17 | 17/01619-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 211/17 | 17/01619-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.09.2017 | 216/17 | 17/01619-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 227/17 | 17/01619-1 |
| 15 Vinnunevndin | | | 17/01619-1 |
| 16 Tekniska nevnd | | | 17/01619-1 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 17/01619-1 |
| 18 Náttúru- og umhvørvisnevndin | | | 17/01619-1 |

**Málslýsing:** Uppskot á greinastøði til fíggjarætlanina 2018 verður lagt fram.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Útsett.

**Trivnaðarnevndin 29. mai 2017:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á sosialu deild løgdu fram um fíggjarætlanina.

**Eldranevndin 29. mai 2017:** Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorgarnarstjórin løgdu fram.

**Mentamálanevndin 31. mai 2017:** Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin løgdu fram.

**Ískoyti:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober. Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Stjórnin leggur uppskot til fíggjarætlanarkarmar á greinastøði fyri fíggjarnevndina at viðgera og góðkenna. Tá uppskotið er viðgjørt og góðkent av fíggjarnevndini verða stjórarnir bidnir um, saman við umsitingini, at gera fíggjarætlanaruppskot fyri 2018.

Stórur búskaparvøkstur er í landinum, seinasta metingin er ein vøkstur á 7-8%. Tórshavnar kommuna er ein munandi partur av hesum. Í teknisku framskrivingini 2018 verður kommunuskatturin mettur til 742 mió. kr. við einum skattaprosentið uppá 19. Kommunuskatturin jan. – apríl er framroknaður liniert umframt ein vøkstur á 3%. Eisini er hædd partvís tikið fyri regulering av kommunuskattinum fyri árið framanundan. Sjálvt um tað gongur væl í løtuni, eigur kommunan at hava ein skynsaman fíggjarpolitikk og varliga inntøkumeting.

Fíggjarleiðarin mælir til, at kommunan vísir fíggjarligt skynsemi við lágum rakstrar vøkstri í so góðum tíðum. Mælt verður til, at fíggjarætlanin skal haldast innanfyri somu karmar sum í 2017. Í hesum uppskoti eru lønarhækkingar ikki tiknar við, lønarhækkingar verða setta inn undir einum seinni í fíggjarætlanartilgongdini. Talan kann vera um hækking í rakstri um talan er um lógarkrøv, býráðssamtykir, sáttmálar o.a. Yvirskipað er málið ein vøkstur í rakstrarútreiðslum uppá í mesta lagi 1,5% fyri alla kommununa.

Í sambandi við rakstrarútreiðslurnar eigur kommunan, at hava støðugt fokus á um skattakrónurnar verða nýttar so skynsamt sum møguligt. Sum ein liður í hesum skulu útveiting og útboð av vørum og tænastum, har kommunan og borgarin kunnu fáa fyrimun, eftirkannast. Eisini verður mælt til at brúkaragjøld í kommununi vera endurskoðaði.

Tórshavnar kommuna hevur samtykt at fara undir fleiri stórar løgur samstundis. Afturat hesum koma fleiri neyðugar, men kostnaðarmiklar løgur. Tórshavnar kommuna hevur út frá verandi fortreytum ein skattafíggjaðan løgukarm á umleið 140 mió. kr. Út frá verandi fortreytum, viðførir hetta ein gjaldføristørv, útyvir skattafíggjaða løgukarmin. Gjaldføristørvurin, kann fíggjast við annaðhvørt tøkum peningi, íløguinntøkum, lánifígging og ella eina kombinatión av nevndu. Býráðið ásetur skatta prosent og barnafrádrátt og kann broyta fortreytirnar. Heldur jaliga gongdin fram kann væntast, at inntøkurnar verða hægri enn væntað fyri 2017, og er møguleiki, at hægru inntøkurnar kunnu gerast partur av fíggingini.

Umráðandi er at hava í huga, at jaliga gongdin, sum longu hevur verið í eitt áramál, skal takast við fyrivarni, tí góðar tíðir halda ikki fram í allar tíðir. Veruleikin við búskaparstøðuni í løtuni er, at Føroyar í nøkur áramál hava ligið í einum hákonjunktur, sum førir við sær, at nógv ferð er á búskapinum. Havast skal í huga, at rentan í fleiri ár, hevur verið óvanliga lág, alivinnan og uppisjóvarvinnan hava verið sera lønandi, oljuprísurin lágur o.s.fr. broytast hesi viðurskifti fær hetta avleiðingar á búskapin. Tí skal vera mælt til, at Býráðið ikki setur fleiri stórar kostnaðarmiklar løgur í gongd komandi ár. Hettar eisini við atliti til, at samlað leggja stóru íløgurnar stórt trýst á búskapin, kommunan fær munandi minni fyri skattakrónurnar, um alt fer av bakkastokki í senn.

Fíggjarætlanin verður løgd fyri fíggjarnevndina 20. september 2017 og fyri býráðið 28. September. Býráðið hevur 1. viðgerð 26. oktober og 2. viðgerð 23. november.

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til, at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlanarkarmar á greinastøði 2018. Stjórarnir skulu saman við umsitingini, gera fíggjarætlan og nýggjar metingar fyri 2018, sambært uppskotinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2017:** Uppskot á greinastøði framlagt og beint í avvarðandi nevndir.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Lagt fram.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Lagt fram.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 14. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært tíðarætlanini skal fíggjarnevndin viðgera uppskot til fíggjarætlan 2018 at leggja fyri býráðið. Tilfar kemur á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við uppskotinum til fíggjarætlan 2018 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum eru, at skattaprosenti verður verandi á sama støði, barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. og hædd er tikið fyri virksemisbroytingum og raðfestingum. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

**Uppskot á greinastøði 2018**

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2016 | Ætlan 2017 | Ætlan 2018 | Broyting 2017/2018 pct. | Broyting 2017/2018 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 742.270 | 695.822 | 756.842 | 8,8% | *61.020* |
| 20601 | Felagsskattur | 32.449 | 22.000 | 30.000 | 36,4% | *8.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.752 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 109.024 | 110.967 | 123.151 | 11,0% | *12.184* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.507 | 37.224 | 36.004 | -3,3% | *-1.220* |
| 20803 | Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 4.866 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| | **Inntøkur íalt** | **925.868** | **868.013** | **947.997** | **9,2%** | ***79.984*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 78.273 | 79.548 | 81.501 | 2,5% | *1.953* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 209.018 | 221.589 | 229.000 | 3,3% | *7.411* |
| §3 | Børn og ung | 153.123 | 161.340 | 168.150 | 4,2% | *6.810* |
| §4 | Undirvísing | 41.732 | 41.310 | 40.988 | -0,8% | *-322* |
| §5 | Mentan og frítíð | 44.496 | 48.544 | 52.164 | 7,5% | *3.620* |
| §6 | Teknisk mál | 125.490 | 123.732 | 130.228 | 5,3% | *6.496* |
| §7 | Kommunal virkir | 12.724 | 28.861 | 32.985 | 14,3% | *4.124* |
| | **Rakstur íalt** | **664.856** | **704.924** | **735.016** | **4,3%** | ***30.092*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.059 | 20.000 | 20.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 69 | 2.000 | 2.656 | 32,8% | *656* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **18.128** | **22.000** | **22.656** | **3,0%** | ***656*** |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **242.883** | **141.089** | **190.325** | **34,9%** | ***49.236*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur | 4.479 | 6.150 | 5.500 | -10,6% | *-650* |
| 20401 | Rentuinntøkur | 1 | 100 | 100 | 0,0% | *0* |
| | **Rentur íalt** | **4.478** | **6.050** | **5.400** | **-10,7%** | ***-650*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri** | **238.405** | **135.039** | **184.925** | **36,9%** | **49.886** |
| | | | | | | |
| | Avdráttir | 16.711 | 17.939 | 19.800 | | |
| | Úrslit av rakstri | 221.694 | 117.100 | 165.125 | 41,0% | 48.025 |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur** | **221.694** | **85.475** | **133.500** | **56,2%** | **48.025** |
| | | | | | | |

Stórur búskaparvøkstur hevur verið seinastu árini. Samlaðu inntøkurnar eru mettar at vera 948 mió. kr. í mun til 868 mió. kr. í 2017. Hettar svarar til ein vøkstur á 9,2%

Í uppskotinum er kommunuskatturin framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í árinum. Harumframt er roknað við einum vøkstri upp á 3%. Eisini er partvís tikin hædd fyri reguleringini í kommunuskattinum fyri 2017. Inntøkur frá kommunuskattinum hækka sostatt 8,8% ella 61 mió. kr. í mun til fíggjarætlanina fyri 2017.

Inntøkur í sambandi við skatti av eftirlønargjøldum og DIS, FAS og frádráttum eru ásettar sambært upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum.

Tórshavnar kommuna er ein kommuna í vøkstri og merkir hettar økt virksemi og tænastur. Samlaðu útreiðslurnar økjast úr 705 mió. kr. til 735 mió. kr. tvs. við 4,3% ella við 30 mió. kr. í mun til upprunaligu fíggjarætlanina fyri 2017.

*§1 kommunual fyrisiting* økist við 2,5% ella 1,9 mió. kr. Økingin stendst í høvuðsheitum av, at peningur er settur av til eldranevndina, fólkaatkvøða verður í 2018, talgilding og fleiri tænastumannaeftirlønir.

*§2 Almanna- og heilsumál* økist við 3,3% ella 7,4 mió. kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin er eldraøkið, har ætlanin m.a. er at útvega fleiri umlættingarpláss. Hædd er eisini tikin fyri at integratíónssamskipari verður settur at veita tænastur til tilflytarar og til integratiónsátøk.

Játtanin til *§3 børn og ung* fylgir í høvuðsheitum barnatalinum sum væntandi verður hægri í 2018. Aðrar raðfestingar á økinum eru m.a. tímar vegna serligan tørv og tilboð til ung. Sambært uppskotinum økjast útreiðslurnar til børn og ung 4,2% ella við 6,8 mió. kr.

Játtanin til *§4 Undirvísing* lækkar í mun til árið frammanundan, við -0,8% ella 322 t.kr. Játtanin fylgir mettað næmingatalinum.

Virksemið á *§5 Mentan og frítíð* er økt. Útreiðslurnar økjast við 7,5% ella 3,6 mió. kr. Hædd er tikið fyri fleiri tiltøkum á mentanarøkinum. Umframt at ætlanin er at økja stuðulin m.a. til Westward Ho. Raksturin á ítróttarøkinum er øktur orsaka av meira virksemi. Kommunan hevur fingið fleri hallir og vallir at umsita.

*§6 Teknisk mál* økist við 5,3% ella 6,5 mió. kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin er uppraðfesting av viðlíkahaldi av bygningum hjá kommununi. Tórshavnar kommuna stendur í vøkstri og verða fleiri nýggj økir at umsita. Í uppskotinum er hettar raðfest við at seta meira av til fríðkan og viðlíkahald.

*§7 Kommunal virkir* økist við 14,3% ella 4 mió. kr. Stórsti parturin av øktu játtanini er ætlað til at styrkja og menna ferðavinnuna í Tórshavnar kommunu.

Sambært fyriliggjandi uppskoti við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 190 mió. kr. Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir 185 mió. kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 133,5 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 22. september 2017:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Framlagt

# 228/17 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 47/17 | 17/00303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 88/17 | 17/00303-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 75/17 | 17/00303-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 105/17 | 17/00303-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 100/17 | 17/00303-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 134/17 | 17/00303-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 124/17 | 17/00303-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 151/17 | 17/00303-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 146/17 | 17/00303-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 187/17 | 17/00303-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 182/17 | 17/00303-1 |
| 12 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 200/17 | 17/00303-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 212/17 | 17/00303-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 228/17 | 17/00303-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Framlagt og góðkent.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Tikið av skrá.
Ískoyti: Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Roknskapurin fyri juli framlagdur og góðkendur.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai, juni og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Framlagt og góðkent.

# 229/17 Flytilig áskoðarapláss o.a. í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 103/17 | 17/01304-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 135/17 | 17/01304-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 26.07.2017 | 190/17 | 17/01304-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.07.2017 | 166/17 | 17/01304-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.07.2017 | 188/17 | 17/01304-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 221/17 | 17/01304-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 229/17 | 17/01304-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 228/17 | 17/01304-1 |

**Málslýsing:**
Kommunan er væl í gongd við útbyggingina av Høllini á Hálsi við nýggjari høll afturat, umframt hølir til judo, borðtennis v.m. Umframt nýggjum stórum parkeringsøki, ið er tikið í nýtslu. Sí mál 14/04763.

Í teirri verkætlanini eru nakrar veitingar, ið eru sonevndar byggiharraveitingar, t.v.s. ikki partur av arbeiðstøkunum.Talan er um flytiliga áskoðarapláss (teleskop-tribunur), umframt mál, ljóðanlegg og máltalvur.

Verkætlanarbólkurin fyri útbyggingina hevur gjørt undankanning og viðgerð av viðurskiftunum. Inn er komin nøkur ref. tilboð. Við støði í teimum kann hugsast t.d. uml. 527 setur í hvørjum enda umframt uml. 148 setur í eystaru langsíðu, umframt part av verandi setrum. Tað gevur uml. 1500 setur, umframt nøkur standipláss. Tó ávíst fyrivarni fyri brunafarleiðum v.m.

Endasetrini liggja um kr. 3500 – 4000 setrið og síðusetrini uml. kr. 2500-3000 setrið. Tað gevur eina útreiðslu á uml. 4.4 mio.kr íroknað kommunalt mvg.

Hava eisini viðgjørt møguleikan at taka verandi síðutribunur burtur og er tað mett til uml. 1.000 tkr. (krevur detailprojekt) og so setur afturat. Hetta gevur fyrimunin at tilber at koma longri burtur frá bananum, har trygdarfrástøðan í dag er heldur tepur.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá málinum við støði tekningum.

Í byggiverkætlanini er ein pulja til ókent og í verandi støðu eru uml. tkr. 2.000 eftir, men enn er alt ov týðiliga at siga um nakað leypur av í teirri puljuni. Eisini hevur verið umrøddur møguleikin fyri at “selja” tribunur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um flytbar áskoðarapláss v.m. við atliti til møguligar fíggjarligar raðfestingar til 2018.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað og greinað málið víðari og fingið fleiri tilboð til vega

**Viðv. verandi áskoðaraplássum**
Sum heild verður mett, at tað er ein fyrimunur at fáa hesar tiknar niður og sett flytilig áskoðarapláss ístaðin. Tað gevur væl størri fleksibilitet í høllini og betri pláss, umframt at trygdin í sambandi við dystir gerst betri, tí at leikvøllurin ikki kemur eins tætt uppá áskoðararnar. Til dystir er frástøðan sum er ov tepur og krevur tað undantak frá galdandi reglum hjá EHF fyri altjóða dystir. Valið stendur í millum at gera arbeiðið nú í summar ella á sumri 2018.

Tilboð er komið uppá arbeiðið frá Suðuroyar Betongsaging Sp/f viðv. niðurtøkuni av verandi áskoðaraplássum og er á uml. 500 tkr. Hetta er nakað lægri enn áður mett, av tí at meðan arbeiðið uppá nýggju høllina er í gongd, ber í størri mun til at brúka størri amboð og at taka áskoðaraplássini út í størri pettum og soleiðis gera arbeiðið lættari og skjótari. Avbjóðingin er hinvegin, at um arbeiðið skal gerast er neyðugt at byrja innan 2-3 vikur fyri ikki at órógva virksemi í verandi høll í heyst. Onnur avbjóðingin er, at tá áskoðaraplássini eru tikin niður, vil ganga ein tíð í millum niðurtøkuna og til nýggj eru komin, tó so, at tað er hugsandi at onkrir fyribils pallar helst kunnu gerast, umframt at størri dystir annars mugu spælast í Hoyvíkshøllini ella Høllini í Kollafirði. Hartil kemur at gólvið skal gerast o.a. í tí sambandi. Hetta arbeiðið er mett til kr. 400 tkr.

**Viðv. kostnaði á flytiligum áskoðaraplássum**
Tilboðini, ið eru innheintaði higartil, eru at rokna sum fyribils tilboð so kommunan kann fáa eina hylling á kostnaðinum. Ætlanin er at fara í eitt formligt innboðið útboð sbrt. innkeypspolitikkinum hjá kommununi. Tað er hugsandi at útboðið vil geva nakað lægri prísir enn teir, sum eru komnir higartil, tó so at endaliga tilgongdin vil staðfesta tað nærri.

Fyribils verður mett, at setur í endunum av høllini kosta uml. 3300 kr./setrið og setur í síðuni á høllini uml. 2500 kr./setrið (tá íroknað sjálvt anleggið, setur, uppseting v.m.). Fleiri uppsetingar eru hugsandi, men t.d. kundu verið umleið 1050-1100 endasetur og umleið 600-800 síðusetur. T.v.s. ein samlaður mettur kostnaður á umleið 6.000 tkr.

Veitingartíðin til áskoðaraplássini er uml. 3 mánaðir, umframt uppseting á nakrar vikur, meðan niðurtøkan av verandi áskoðaraplássum er mett til uml. 2-3 vikur.
Ljóðanlegg, máltalvur og mál
Fyribils verður mett at hesi kunnu útvegast fyri umleið 300-400 tkr.

Fígging
Í verandi støðu ber ikki til at siga um nakað verður at leypa av í sambandi við arbeiðs-tøkurnar, ið eru í gongd í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi. Neyðugt verður við eykajáttan um henda verkætlan skal fremjast í ár. Tó er hugsandi, at veitingin av flytiligu áskoðaraplássunum kann fella hinumegin árskiftið.

Málið kemur fyri býráðið aftur, at taka av tilboði.

**Tilmæli**
Kommunustjorin, trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a) at fara undir at taka niður verandi áskoðarapláss á eystaru síðu í verandi høll

b) at fara undir útboð av flytiligum áskoðaraplássum á.v.v. á norðaru síðu, sunnaru síðu og eystaru síðu.

c) at fara undir at heinta inn tilboð uppá máltalvur v.m.

d) at fíggja verkætlanin av konto 6175 - Umsiting og røkt av fastari ogn (íløgur)

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. juli 2017:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at veitingin verður boðin út alment og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. juli 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Olsen | Helena Dam á Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Heðin Mortensen |
| | Bjørg Dam | |